Nr. 12 • januar 2012

# MIÐ & MAGN

Føroya Skipara- og Navigatørfelag & Maskinmeistarafelagið



**ÚTGEVARI**
Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag geva MIÐ & MAGN út í felag.
Blaðið verður sent limunum.
4 útgávur eru um árið.

**BLAÐNEVND**
Páll Hansen (ábyrgd)
Regin Nónstein
Eyðstein Djurhuus
Jóan Petur Patursson

**MASKINMEISTARAFELAGIÐ**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Telefon 31 47 18
Teldupostur: mf@mf.fo

**FØROYA SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAG**
Jekaragøta 10
Postboks 248
110 Tórshavn
Telefon: 31 69 73
Teldupostur: fsn@fsn.fo

**BLAÐHALD**
Tey, sum ynskja at halda MIÐ & MAGN, kunnu boða frá hesum í teldupost til:
bladhald@midogmagn.fo
Haldara gjaldið er 200,- kr. um árið; t.v.s. 4 bløð.

**ENDURGEVING**
Tað er loyvt at endurgeva tekst úr MIÐ & MAGN, tá keldan verður upplýst.
MIÐ & MAGN kann heintast í PDF á heimasíðunum hjá feløgunum:
www.mf.fo
www.fsn.fo

**FORSÍÐUMYND**
Karin Mikkelsen fekk handað maskinmeistaraprógv í Vinnuháskúlanum 21. des. 2011

**UMSITING**
Sp/f MEDIA
info@midogmagn.fo

**UMBRÓTING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ**
Føroyaprent · www.foroyaprent.fo

UPPLAG: 1900



# Fiskimannafelagið 100 ár

Mið og Magn ynskir Føroya Fiskimannafelag hjartaliga tillukku við runda føðingardegnum. Søgan byrjar í desember mánaði í 1910, tá varð fyrsta stigið til at stovna felagið tikið. Tað vóru framfýsnir fiskimenn í Gøtu, sum slóðaðu fyri og felagið varð síðani stovnað í Tórshavn 14. november 1911.

Tá setti Fiskimannafelagið sær fyri at virka fyri øllum tí, ið er til frama fyri fiskivinnu og fiskimenn. Fiskimannafelagið hevur síðani ment seg til at vera eitt tað týdningarmesta felagið í føroyska samfelagnum. Okkurt stríð og verkføll hava verið á leiðini, men tað er ringt at umganga skal eitt felag røkka sínum málum.

Fiskimannafelagið hevur sanniliga ment samfelagið seinastu 100 árini: Frá útróðrarbátinum til slupptíðina, ígjøgnum krígsár og truplu fimmtiárini. Í sekstiárunum varð fiskiflotin endurnýggjaður. Tað setti nýggj krøv, sum felagið ikki kastaði frá sær.

Í sjeytiárunum menti rækjuflotin samfelagið, og í áttati og nítiárunum nótaskip og svartkjaftaskip. Og í dag hevur makrelfiskiskapurin avgerandi týdning fyri føroyska samfelagið. Allar hesar avbjóðingar hevur Fiskimannafelagið megna at lyft.

At skipaflotin er tódnaður seinnu árini merkir eisini, at flotin og manning eru vorðin effektivari.

Fiskimannafelagið hevur røkt sína skyldu væl, og hevur mangan prógvað, at felagið eisini vil ganga nýggjar leiðir.

Í 1958 gjørdist Fiskimannafelagið limur í ITF; og var fyrsta føroyska felagið í hesum felagsskapi, sum í dag hevur stóran týdning. Tað prógva greinir í Mið og Magn nr. 12.

Eitt annað dømi um nýhugsan er sjómannadeildin hjá felagnum. Hon røkir áhugamálini hjá teimum, sum eru í farmasigling og frálandavinnu.

Vónandi fara vit at síggja nógv fleiri fólk í hesum vinnugreinum, nú tað tynnist í fiskiflotanum.

Tey trý manningarfeløgini stovnaðu fyri gott einum ári síðani felagsskapin FMU, sum skal taka sær av sáttmálum hjá útlendingum, sum sigla við skipum skrásett undir FAS. Hendan avbjóðingin hevur verið við til at menna samstarvið millum tey trý manningarfeløgini.

*Vegna Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið*

*Páll Hansen, ábyrgdarblaðstjóri*




# Innihaldsyvirlit


Hátíðarhald á Vinnuháskúlanum .............. 4
Nýklaktur maskinmeistari .................... 6
41 prógv og virðislønir ...................... 8
FAS við atliti til eftirlønir og skatt............. 10
Skipara- og Navigatørfelagið aðalfund......... 12
Føroyskur fiskivinnupolitikkurin
skiftir eins og veðrið ........................ 13
Strandfaraskip Landsins ..................... 14
Rættarmál vegna limir ...................... 16
Tilbúgving, samstarv og trygging ............. 17
Reiðarafelagið kastaði frá sær – einaferð enn .... 19
Brennidepilin: Jógvan J. Isaksen .............. 20
Siglandi fólkið stóran týdning
fyri okkara samfelag ......................... 22
FAS lýst sum hentleikaflagg av ITF............ 27
Tíndindi frá Skipara- og Navigatørfelagnum .... 30
Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum........... 32
Føðingardagar ............................... 34
50 ára minni: Tá Porkeningur varð bygdur ...... 35
Ikki pláss til allar í Føroyum .................. 39







# Hátíðarhald á Vinnuháskúlanum

**21. desember 2011 var hátíðarhald og próvhandan á Vinnuháskúlanum. Undir hátíðarhaldinum vóru tilsamans 41 prógv handað. Til hátíðarhaldið var nógv fólk komið saman, samkomuhøll skúlans var fullsett. Skúlastjórin, umboð fyri Maskinmeistarafelagið, Skipara- og Navigatørfelagið og onnur fluttu fram røðu og ynsktu teimum, sum fingu prógv tillukku við degnum. Gestarøðari var Ben Arabo stjóri í Atlantic Petroleum.**

## HANS JOHANNES Á BRÚGV

Í røðu síni segði skúlastjórin Hans Johannes á Brúgv m.a.

Í dag hava vit fingið eitt lið av nýggjum maskinmeistarum og navigatørum. Hesi eru 17 maskinmeistarar, 15 skiparar og 9 skipsførarar. Tað vil siga, at vit í dag handa tilsamans 41 prógv.

Vanliga skúlatíðin hjá skipsførarum og maskinmeistararnir er 3 ár, og hjá skiparum 1½ ár.

## KVINNUR

Í ár hava vit eina kvinnu sum fær prógv sum maskinmeistari – tað er Karin Mikkelsen. Tað eru 8 ár síðani tann seinasta kvinnan fekk maskinmeistaraprógv í Føroyum.

Hetta hálvárið hava verið í alt 3 kvinnur á Vinnuháskúlanum, tvær til maskinmeistara og ein til skipara, saman við knapt 300 monnum, so her vantar nógv í til javnstøðu.

## TILGONGDIN

Tilgongdin til útbúgvingar okkara hevur verið góð seinastu árini. Vit hava í dag nógvar umsøkjarar og nú í januar kemur inn ein fullsettur flokkur til maskinmeistara, ein flokkur til skipara og ein til skipsførara.

Vit hava nógvar umsøkjarar til maskinmeistara, so um pengar vóru tøkir, høvdu vit tikið dupultan flokk inn. Játtan skúlans røkkur tí verri ikki til hetta.

## OFFISERAR

Føroyskir offiserar á maskinu ella brúgv hava eitt sera gott umdømi. Vit hava áralanga siðvenju innan hetta yrki. Undangangarar tykkara hava lagt støðið.

Tit fara eins og undangongumenn tykkara at føra stór skip, leiða stórar verksmiðjur og stórar maskinur, tí álit er á tykkara útbúgving. Føroyingar við hesum útbúgvingum eru meiri eftirspurdir enn fólk úr øðrum heimsins londum.

Eg vóni tí, at tit liva upp til hetta álit, soleiðis at næstu próvtakarar við somu útbúgvingum fáa sama møguleika.

Nú tit hava staðið útbúgvingina og fingið prógv, eru tit útbúnir leiðarar. Tað merkir ábyrgd eins og at leiða og fordeila arbeiðið. Knappliga eru tit hinumegin borðið, – fyrst sum undirleiðarar. Tað merkir, at tá tit síggja okkurt, sum fer av kós, so skulu tit rætta tað upp.

Útbúgving tykkara hevur givið tykkum vitan um maskinu, el og teknikk. Eisini um navigatión, veður og mál. Men tit hava eisini fingið økt tykkara „almennu vitan" við leiðslu, virkisbúskapi og mentan. Hetta gevur eisini barlast til at leiða, tað verður seg bæði føroyingar og útlendingar.

## TØRVUR

Í mong ár hava vit útbúgvið fólk til føroyska fiskiflotan og danska handilsflotan. Vit mugu staðfesta, at her eru broytingar hendar tey seinastu fáu árini. Føroysku fiskiskipini fækkast, og er tað blivið trongligt í føroyska fiskiflotanum, ímeðan tað er ein penur vøkstur í føroyska offshore-flotanum. Nógvir føroyingar arbeiða tí í dag í føroysku offshorereiðaríunum.





Eyðstein Djurhuus handar Harry Thomsen barograf fyri hægsta próvtal



Nógv fólk var við til hátíðarhaldið

Vit hava lagt til merkis, at nógv fleiri enn áður søkja sær hýru í norsku offshore-vinnuni og norska fiskiflotanum. Tað vísir seg at vera attraktivt at fara í norska flotan, og eru seturnartreytirnar góðar.

Hetta merkir, at vit mugu snara okkara útbúgving eitt sindur. Donsku og Norsku nationalu krøvini eru ikki heilt eins. Vit fylgja við rákinum og arbeiða við neyðugum broytingum.

Tíðirnar í Føroyum og generelt í heiminum eru sera óróligar, og fólk missa arbeiðið. Vit síggja tó, at fólk við hesum útbúgvingum framvegis fáa góð arbeiði. Harafturat hoyra vit eisini, at útlitini innan offshore-vinnuna fyri 2012 eru positiv.

## MENTAMÁLARÁÐIÐ

Mentamálaráðið hevur avgjørt at broytingar skulu gerast í verandi útbúgvingum.

Tað, sum liggur á borðinum er, at maskinmeistara- og skipsførara-útbúgvingarnar verða skipaðar sum bachelorútbúgvingar.

Nær hetta verður er enn eitt sindur ógreitt, men miðað verður ímóti, at fyrsta upptøkan til nýggju útbúgvingarnar verður á sumri í 2013.

Eisini er avgjørt, at Føroyar skulu hava eina sokallaða aspirant-útbúgving. Ætlanin er, at avtalur skulu gerast við reiðaríini, sum eiga størru føroysku skipini og við reiðaríini, sum sigla undir FAS skipanini. Tað er í dag torført at fáa neyðugu siglingartíðina fyri seinni at fáa endaligt vinnubræv.

Henda nýggja aspirarantskipanin kemur at gera tað meiri atkomiligt fyri tann unga føroyingin, sum ynskir at arbeiða á sjónum.

# Nýklaktur maskinmeistari

Millum maskinmeistararnar, sum fingu prógv á Vinnuháskúlanum 21. desember 2011 var Karin Mikkelsen úr Sørvági. Aðrar kvinnur hava fingið maskinmeistaraprógv áðrenn Karin, men hesaferð var hon einsamøll í flokkinum. Vit hittu Karin, tá prógvini vóru handað í Vinnuháskúlanum. Karin byrjaði at læra til jarnsmið á maskinverkstaðnum hjá Tausen í Sørvági. Men tá hon hevði lært har í tvey ár bleiv smiðjan seld. Tá broytti smiðjan navn til Vestmek, og Karin helt fram við læruni hjá nýggju eigarunum, og varð útlærd fyrst í november 2007.

## YMISKAR ROYNDIR

Tá læran var fingin frá hondini arbeiddi Karin eina tíð sum sveinur í Sørvági.

Vit spyrja Karina hvørjir arbeiðsmøguleikar vóru hjá einum smiði í Sørvági. Hon greiðir frá, at hon arbeiddi í einari lítlari smiðju úti á keiuni í Sørvági.

Av tí, at tað er ein lítil smiðja, so havi eg faktiskt roynt eitt sindur av hvørjum. Ikki akkurát tey somu tingini, sum man fær høvi at royna á eini stórari skipasmiðju, men alt vanligt smiðjuarbeiði.

Rættiliga nógv arbeiði var umborð á bátum, og so var alt fyrifallandi arbeiði eftir tørvi hjá fólki, sum komu inn á verkstaðið, og høvdu brúk fyri einum smiði. Talan kundi eisini vera umrørarbeiði.

Karin greiðir nú frá, at í mai 2008 flutti hon til Grønlands, men hon leggur dent á, at tað var ikki tí, at hon hevði fingið arbeiði sum handverkari í Grønlandi.

Tað hevði onki við mítt fak at gera; eg hevði fingið samband við eitt føroyskt par, sum sóknaðist eftir eini „barnagentu“. Tey arbeiddu sum løgreglufólk í Grønlandi, og áttu tveir fittar smádreingir, sum tey ynsktu eina føroyska gentu at taka sær av. Eg tók av, og tað angri eg ikki; eg var í Grønlandi í góðar tríggjar mánar.

## VOLUNTØR Í AFRIKA

Og tá eg hevði verið heima í ein mánað legði eg leiðina suðureftir til Afrika.

Karin greiðir frá, at hon hevði søkt Dansk Etiopia Mission um starv sum voluntør.

Tá ynskti hon at sleppa út í eitt annað land at brúka sína útbúgving, og fáa nýggjar avbjóðingar. Hon ynskti at sleppa at brúka tað, sum hon hevði lært í lærutíðini, og at sleppa at royna faki í einum heilt øðrum umhvørvi. Og Karin var heppin við umsóknini; Dansk Etiopia Mission bjóðaði henni starv sum voluntør í Etiopia í tríggjar mánar.

Vit undrast, og spyrja hana, hvussu ein føroysk handverksútbúgving kundi brúkast í Etiopia.

Fyrst og fremst tók eg mær av ymiskum fyrifallandi arbeiði sum hóskaði til mín førleika. Tað var ordiliga spennandi, sigur Karin avgjørd. Eg fekk veruliga roynt meg undir heilt øðrum umstøðum, og lat meg her fyrst nevna, at har vóru so at siga ongi amboð – í hvussu er ikki amboð, sum eg var von við í smiðjuarbeiði.

Tí setti eg mær fyri at gera míni egnu amboð. Tað var ikki annað at gera enn at finna uppá okkurt, sum kundi rigga. Í hesum sambandi kann eg bert siga, at har



*Páll Hansen handar Karin Mikkelsen blómur frá Maskinmeistarafelagnum*

lærdi eg nógv, sum eg ikki hevði kunna lært í Føroyum; umstøðurnar kunnu – snøgt sagt – ikki samanberast.

## MILLUM MENN Í VINNUHÁSKÚLANUM

Karin kom aftur til Føroya beint fyri jól í 2008, og byrjaði á Vinnuháskúlanum fyrst í januar 2009.

Vit spyrja so Karin, hvussu tað hevur rigga at vera kvinna í manfólkaumhvørvinum á Vinnuháskúlanum í so langa tíð. Og hon er skjót at svara, at tað hevur slett ikki verið nakar trupulleiki; handan spurningin eri eg so von við. Eg hevði jú staðið í smiðjulæru, og har vóru ikki mong konufólk. So tað var eg væl fyrireikað uppá.

Vit spyrja so Karin, hvussu tað er at vera kvinna í manfólkaumhvørvinum í eini jarnsmiðju.

Karin greiðir frá, at í fyrstani, tá man byrjar at læra var so nógv nýtt. Eg vandist skjótt við alt. Eg vandi meg eisini við, at menn komu inn í smiðjuna, og spurdu um onki mannfólk var í smiðjuni, eg kundi aldrin í verðini blivið fornermað av hesum.

Eg havi heldur hug at siga, at tað sigur seg sjálvt, at t.d. ein 80 ára gamal maður, sum kemur við onkrum hann skal hava gjørt, ikki veit at eitt konufólk skal gera arbeiðið, sum menn eru vanir at gera.

Hetta er nógv broytt seinastu árini, nú er tað nógv meira vanligt, at kvinnur arbeiða sum handverkarar.

## KVINNUHENDUR

Karin hevur nógv um at vera; tað er bert ein lítil løta síðani hon fekk prógvið handað, so vit seta okkara síðsta spurning. Hevur tú ongantíð hildið, at arbeiðið dálkar illa ella fer illa við hondunum. Nei eg havi onki ímóti at dálka mær hendurnar, so sær man, at man hevur gjørt okkurt til nyttu.

Onkuntíð havi eg møtt upp til arbeiðis við neglalakki, sjálvt um eg ikki eri tann, sum gongur við neglalakki, so royni eg bara at gera mítt besta.

Tað er líkamikið, hvussu eg síggi út bæði áðrenn og aftaná arbeiði sigur Karin brosandi at enda.

# 41 prógv og virðislønir



**SKIPARAR:**

- Harry Thomsen
- Evald Norðberg
- Jan Jógvan Jacobsen
- Heri Norðberg
- Sigmar S. Eyðsteinsson
- Hallur H. Samuelsen
- Bogi Joensen
- Rógvi á Lava Olsen
- Jónleif Kass
- Zacharias Jan Thomassen
- Jón Ingi Jacobsen
- Bjarni Nielsen
- Benny Samuelsen
- Arvid C. Vilhelmsen
- Henry Mohr

**VIRÐISLØNIR:**

1. Harry Thomsen: kikara frá P/F Thor
2. Sigmar Eyðsteinsson: barometur og klokkusett frá Faroe Agency.
3. Evald Norðberg: barometur og klokku frá Faroe Ship.



**MASKINMEISTARAR:**

- Thorstein Róason Vang
- Hans Sjúrðaberg
- Sandy í Lambanum
- Rani Danielsen
- Teitur Olsen
- Klæmint Vágadal
- Mads Jacobsen
- Kaj Vilhelm Meyer
- Heri Vang
- Hans Kári Hansen
- Eli Jógvansson Christiansen
- Brian Flemming í Gong
- Eyðbjørn Hansen
- Fróði Hansen
- Karin Mikkelsen
- Djóni Alberg
- Torkil Nielsen

**VIRÐISLØNIR:**

1. Torkil Nielsen, fototól frá BANK NORDIK
2. Fróði Hansen, mátitól frá Maskinmeistara-felagnum

**ÍDNISVIRÐISLØN:**

Mads Jacobsen, gullur frá A. P. Møller



**SKIPSFØRARAR:**

- Esmar P. Petersen
- Eyðstein Ólason
- Brynjálvur Niclassen
- Ove Frederiksen
- Tummas M. Hansen
- Kári K. í Kongsstou
- Ernst S. Magnussen
- Jákup Pauli Lassen
- Johan K. Jacobsen

**HÆGSTA PRÓVTAL:**

Skipara- og Navigatør-felagið handaði Harry Thomsen barograf fyri hægsta próvtalið.

**VIRÐISLØNIR:**

1. Esmar P. Petersen: gullur frá A. P. Møller.
2. Eyðstein Ólason: klokkusett frá Tryggingarfelagnum Føroyar.

**PRIMUS MOTOR:**

Ove Frederiksen fekk ur, kvív og pennasett frá Søfartens Ledere fyri at vera kosin „primus motor“ millum tey lesandi.

# Skeiðskema 2012



| Nr. | Skeiðnavn | Dagar | DKK | jan. | feb. | mar. | apr. | mai. | jun. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ARPA skeið<br>ARPA AUTOMATIC RADAR PLOTTING AIDS | 4 | 8.900 | | 27 | | | 14 | |
| 2 | GOC (Generelt certifikat sum radiooperatørur) Nýtt<br>GOC GENERAL OPERATOR CERTIFICATE (NEW) | 15 | 14.900 | | | | | | |
| 3 | GOC-endurnýggjan<br>GOC GENERAL OPERATØR CERTIFICATE, RENEWAL OF COURSE | 7 | 7.000 | | | | | 19 | |
| 4 | LRC (Avmarkað radioskeið)<br>LRC LONG RANGE CERTIFICATE | 7 | 8.900 | | | | | | |
| 5 | LRC við Inmarsat<br>LRC LONG RANGE CERTIFICATE, WITH INMARSAT | 8 | 9.950 | | | | | | |
| 6 | Tankers Safety serskeið fyri olju- gas- og kemikaliutangakip<br>TANKERS SAFETY, SPECIAL COURSE FOR OIL-, GAS- AND CHEMICAL TANKERS | 5 | 6.800 | | 6 | | | 29 | |
| 7 | Flutningur av vandamiklum farmi<br>TRANSPORT OF DANGEROUS GOODS IN DRY CARGO SHIPS | 3 | 5.400 | 23 | | | 30 | | |
| 8 | Eftirútbúgving sum sjúkraviðgeri (Heilsulæra)<br>SUPPLEMENTARY TRAINING IN MEDICAL PROFICIENCY | 4 | 7.500 | 18 | | | 18 | | |
| 9 | Eftirútbúgving sum sjúkraviðgeri (Heilsulæra). um prógvið er eldri enn 10 ár<br>SUPPLEMENTARY TRAINING IN MEDICAL PROFICIENCY<br>WHEN CERTIFICATE IS OLDER THAN 10 YEARS | 10 | 12.000 | | | | | | |
| 10 | ECDIS (elektroniskt sjókort)<br>COURSE IN ELEKTRONIC CART DISPLAY INDICATION SYSTEM | 4 | 8.900 | | 7 | | | 21 | |
| 11 | Endurnýggjan av vinnubrævi<br>RENEWAL OF MARITIME TRAINING CERTIFICATE | pr. dag | 1.500 | | | | 17 | | |
| 12 | SSO-skeið<br>COURSE FOR SHIP SECURITY OFFICERS | 3 | 5.400 | | | 5 | | | 4 |
| 13 | § 16-skeið<br>WORKING ENVIRONMENT §16-COURSE | 4 | 5.800 | | | | 10 | | 11 |
| 14 | Ketilpassaraskeið. Skeiðið verður 5 fylgjandi fríggjadagar<br>COURSE AS BOLIER TENDER | 5 | 7.500 | | | | | | |
| 15 | Eldsløkking umborð á skipi. STCW A-VI/1-2<br>FIRE FIGHTING ON BOARD SHIPS | 3 | 5.880 | 30 | | 5,12<br>26 | 16 | 18<br>29 | |
| 16 | Endurtøku eldsløkking umborð á skipi. STCW A-VI/1-2<br>REFRESHER COURSE IN FIRE FIGHTING | 1 | 2.990 | 5 | 9 | 8 | 12 | 10 | 1 |
| 17 | Sløkkileiðsla umborð á skipi. STCW A-VI/3<br>ADVANCED FIRE FIGHTING | 2 | 4.275 | | | | | | |
| 18 | Eldsløkking fyri skipsyvirmenn<br>FIRE FIGHTING FOR SHIPS OFFICERS | 5 | 10.160 | 9<br>16,23 | 13<br>27 | | | | 4 |
| 19 | Sløkkiliðsfólk uttan sløkkibil. STCW A-VI/1-2 & STCW A-VI/3<br>ADVANCED FIRE FIGHTING FOR SHIPS OFFICERS | 5 | 9.000 | | | | | | |
| 20 | Sløkkiliðsfólk við sløkkibili | 10 | 18.000 | | | | | | |
| 21 | Brunaumsjónarmenn | 7 | | | | | | | |
| 22 | Venjing fyri sløkkilið | 1 | 1.875 | | | | | | |
| 23 | Eldsløkking og bjarging í tunlum | 3 | 7.290 | | | | | | |
| 24 | Grundleggjandi eldsløkking. (Fyri virkir, stovnar og einstaklingar) | 1 | 900 | | | | | | |
| 25 | Grundleggjandi trygdarskeið fyri sjómenn. STCW A-VI/1-1, A-VI/1-3, A-VI/1-4<br>BASIC SAFETY TRAINING | 3 | | | | | | | |
| 26 | Fult trygdarskeið fyri sjómenn. STCW A-VI/1-1,A-VI/1-2, A-VI/1-3, A-VI/1-4<br>BASIC SAFETY TRAINING | 6 | 10.570 | | | | | | |
| 27 | Bátaføraraskeið. STCW A-VI/2-1<br>PROFICIENSY IN SERVIVAL CRAFT AND RESCUE BOATS | 4 | 4.840 | | | | | | |
| 28 | Medisinsk fyrstahjálp. STCW A-VI/4-1<br>MEDICAL FIRST AID | 4 | 6.180 | | 27 | | | | |
| 29 | Maritime Legislation. e-learning (Sign up on www.vh.fo)<br>FØROYSK SJÓVINNULÓG. E-LEARNING | | 5.000 | | | | | | |

Vinnuháskúlin treytar sær rætt at avlýsa skeið, um ov fá eru tilmeldað.

KREA · TEL 60 80 80

Nóatún 7 · FO-100 Tórshavn · Tel 350 250 · Faks 350 251 · info@vh.fo · www.vh.fo

VINNUHÁSKÚLIN
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

# FAS við atliti til eftirlønir og skatt

Í 2005 setti landsstýrið ein arbeiðsbólk at endurskoða reglurnar viðvíkjandi Føroysku Altjóða Skipaskrásetingini (FAS). Samgongan hevði sett sær fyri at gera altjóða skipaskrásetingina kappingarføra mótvegis øðrum skipaskrásetingum soleiðis, at skipaskráseting kundi gerast eitt íkast til føroyska búskapin.

Yvirskipaði arbeiðssetningurin hjá arbeiðsbólkinum var at kanna fortreytirnar fyri einari meira kappingarførari FAS-skipan mótvegis øðrum skipaskrásetingum. Meira ítøkiliga var arbeiðssetningurin m.a. at kanna fíggjarliga kappingarførið hjá FAS, herundir við atliti til inntøkuskatt.

Við tilvísing til 7 altjóða skipaskrásetingar (Bahamas, Isle of Man, Panama, Liberia, DIS, Marshall Islands og Belize), sum ikki krevja skatt frá manningini, mælti arbeiðsbólkurin til, at inntøkuskatturin hjá manningini varð lækkaður niður í 23% brutto og at afturberingsprosentið samstundis varð tillagað.

> *Besti møguleikin at fáa lut í alheimsgerðini er at byrja við vinnuøkjum, har vit hava natúrligar fortreytir. Vit hava á ein varisligan hátt roynt altjóða skipaskráseting í nøkur ár, og nú menna vit skipanina so at altjóða sjóvinna gerst ein føroyskur vinnuvegur.*
>
> *Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í sjóvinnumálum, 2005*

Arbeiðsbólkurin metti at føroyski partafelagsskatturin uppá 18% var kappingarførur og varð tí ikki mælt til at gera broytingar hesum viðvíkjandi.

Alternativt varð mælt til, at Føroyar tóku upp samráðingar við Ísland og Noreg til tess at fáa eina protokoll til tann norðurlendska tvískattasáttmálan, sum gav flaggstatinum einarættin til at skatta lønarinntøkur frá altjóða sjóferðslu. Í hesum sambandi skuldi eisini atlit takast til grein 26, stk. 2 „subsidiera beskatningsrættin“ í sama sáttmála, sum loyvir bústaðarlandinum at skatta eina inntøku, sum flagglandið, sum hevur beskatningsrættin, ikki ger brúk av.

### ÁVEGIS TILMÆLI

Fyri at verandi skip í FAS ikki skuldu flagga út varð ávegis mælt til, at manningarnar á FAS-skipum við avmarkaðari skattskyldu, t.v.s. útlendingar, sum áðrenn broytingina rindaðu 36,12% í skatti við einari afturbering til reiðaríið uppá 28%, komu undir eina skipan við einum skatti uppá 35%.

Við løgtingslóg nr. 107 frá 13. desember 2006 samtykti løgtingið at avmarkað skattskyldug, t.v.s. útlendingar ella føroyingar búsitandi uttanlands, frá 1. januar 2007 at rokna skuldu rinda 35% í skatti, og við kunngerð nr. 125 frá 21. desember 2006 varð afturberingsprosentið broytt til 30%.

## NÝTT LÓGARUPPSKOT

Hálvt annað ár seinni, t.v.s. tann 22. apríl 2008, varð eitt nýtt lógaruppskot lagt fyri løgtingið. Í stuttum gekk uppskotið út uppá, at FAS-sjómenn við fullari skattskyldu til Føroyar, t.v.s. FAS-sjómenn búsitandi í Føroyum, framyvir skuldu rinda ein bruttoskatt uppá 35% ístaðin fyri vanligan inntøkuskatt við einum frádrátti eftir § 25a, stk. 7 í skattalógini uppá 14%.

Uppskotið hjá landsstýrinum varð samtykt við 3. viðgerð tann 30. mai 2008 og kom í gildi 1. januar 2009.

Við kunngerð nr. 120 frá 19. desember 2008 varð afturberingsprosentið eisini broytt til 35%. Eisini kunngerðin kom í gildi tann 1. januar 2009.

Í mun til skipanina, sum var galdandi fram til 2007, er tað eingin ivi um, at FAS við omanfyri nevndu broytingum gjørdist ein munandi betri skipan, men í mun til uppskotið frá arbeiðsbólkinum blivu broytingarnar í FAS-skipanini ikki heilt so stórar sum man hevði vónað og væntað.

## EFTIRLØNIR OG FRÁDRÁTTARRÆTTUR

Sum omanfyri nevnt verður FAS-inntøkan bruttoskattað sum eftir § 8 í løgtingslóg um áseting av skatti. At ein inntøka verður bruttoskattað merkir, at skattur verður roknaður av allari inntøkuni, og tað er ikki loyvt at draga nakran frádrátt frá inntøkuni heldur ikki inngjøld til eftirlønarskipanir.

> EFTIR UPPSKOTINUM SKULU 40% RINDAST Í SKATTI AV ØLLUM EFTIRLØNARINNGJØLDUM, OG HETTA ER GALDANDI BÆÐI FYRI FULT OG AVMARKAÐ SKATTSKYLDUG.

Av nevndu orsøk hava nakrir sjómenn, sum sigla undir FAS-skipanini, valt at spara saman av skattaðum peningi. Samansparing av skattaðum peningi skal ikki skattast umaftur, tá hon verður útgoldin við eftirlønaraldur.

Tá teir somu persónarnir arbeiða uppi á landi, kunnu (og eftir Pensjónsnýskipanini, sí niðanfyri, skulu) teir gjalda til eina eftirlønarskipan, har teir kunnu draga eftirlønargjaldið frá í skattskyldugu inntøkuni. Tá frádráttur verður veittur í sambandi við inngjald, skal peningurin skattast, tá hann kemur til útgjaldingar við eftirlønaraldur.

## PENSJÓNSNÝSKIPANARUPPSKOTIÐ

Fyri at sleppa undan, at FAS-sjómenn skuldu hava tvey ymisk sløg av eftirlønarskipanum, legði Pensjónsnýskipanaruppskotið, sum varð lagt fyri løgtingið 1. mars 2011, upp til, at frádráttur varð loyvdur í FAS-inntøkuni áðrenn skatt. Ítøkiliga legði uppskotið upp til, at FAS-sjómenn frá 2014 at rokna fingu frádrátt í skattskyldugu inntøkuni fyri inngjald til eftirlønarskipanir áðrenn skatt eins og aðrir skattgjaldarar. Broytingin hevði havt við sær, at FAS-sjómenn kundu gjalda inn til eina og somu eftirlønarkonto uttan mun til, um inntøka teirra stavaði frá landi ella sjógvi.

> ÍTØKILIGA LEGÐI UPPSKOTIÐ UPP TIL, AT FAS-SJÓMENN FRÁ 2014 AT ROKNA FINGU FRÁDRÁTT Í SKATTSKYLDUGU INNTØKUNI FYRI INNGJALD TIL EFTIRLØNARSKIPANIR

Pensjónsnýskipanaruppskotið bleiv sum kunnugt ikki til nakað, tí uppskotið fall burtur sbrt. § 15, stk. 3 í stýrisskipanarlógini, tá tingsetan endaði 1. juni 2011.

6. desember 2011 varð uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skatt av rentutryggingum v.m. lagt fyri løgtingið. Uppskotið varð samtykt við 3. viðgerð 23. desember 2011 og kom í gildi 1. januar 2012.

## 40% Í SKATTI AV EFTIRLØNARINNGJØLDUM

Eftir uppskotinum skulu 40% rindast í skatti av øllum eftirlønarinngjøldum, og hetta er galdandi bæði fyri fult og avmarkað skattskyldug.

Uppskotið hevur ikki nakrar serreglur fyri FAS, og ber hetta í sær, at inngjald til eftirlønir hjá FAS-sjómonnum eisini verður skattað 40%.

Eftir ætlan verður uppskotið til Pensjónsnýskipan aftur lagt fyri løgtingið í vár við tí endamáli, at Pensjónsnýskipanin ella partar av henni kunnu koma í gildi 1. januar 2013. Um hetta uppskotið kemur at hava nakrar serreglur fyri FAS, kann bert tíðin vísa.



*Skrivað:*
*Jákup Eyðfinn Kjærbo,*
*løgfrøðingur.*

# Skipara- og Navigatør-felagið aðalfund

## FØROYA SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAG: AÐALFUNDUR

Aðalfundur Føroya Skipara- og Navigatørfelag varð hildin mikudagin 28. desember 2011 á Hotel Føroyum.

**Á skránni vóru hesi mál:**

A. Frásøgn frá formanninum um virki felagsins í farna ári.
B. Framløga og støðutakan til roknskapin.
C. Val av nevndarlimum.
D. Val av grannskoðara og tiltaksgrannskoðara
E. Ásetan av limagjaldi.
F. Ymiskt.

Gestarøðari var Ben Arabo, stjóri hjá Atlantic Petroleum. Frásøgn formanssins um virki felagsins í farna ári er so mikið drúgv, at vit ikki kunnu hava alla frásøgnina í blaðnum, men vit nevna her yvirskriftirnar:

1. Reiðarafelagið kastaði frá sær – einaferð enn!
2. Farma og frálandaskip
3. Rættarstøðan flutt - til okkara fyrimun
4. Umráðandi at vísa til sáttmálan á mynstringarskjalinum
5. Strandferðslan
6. FAS á listan hjá ITF yvir hentleikafløgg
7. Samlagstryggingin
8. Tilbúgving á sjónum
9. Skal FSN eisini umboða útisiglarar?
10. Samstarv við onnur feløg
11. Útlitini fyri nýggja árið

*Gev gætur: Øll ársfrágreiðingin er at lesa á heimasíðu felagsins: www.fsn.fo*

**Val av nevndarlimum**

Sambært viðtøkum felagsins eru 11 nevndarlimir; og eru teir valdir at sita í tvey ár. Teir, sum stóðu fyri vali hesaferð vóru: Ellintur M. Abrahamsen, Regin Nónstein, Jákup Gøthe og Ólavur Biskupstøð. Jan Kristoffersen stóð eisini fyri vali, men hann hevði frammanundan boðað frá, at hann ikki tók við afturvali.

Tá talt var upp eftir atkvøðugreiðsluni vóru hesir 5 valdir: Ellintur M. Abrahamsen, Regin Nónstein, Jákup Gøthe, Ólavur Biskupstøð og Andrias Højgaard.



*Eyðstein Djurhuus, formaður*



*Nevndarlimir uttast frá vinstru: Eyðstein Djurhuus, Annfin Garðalíð, Leivur Christiansen, Leif Joensen, Regin Nónstein, Jákup Gøthe, Ólavur Biskupstøð og Johannus Jacobsen*

# Føroyskur fiskivinnupolitikkurin skiftir eins og veðrið

Veiðan eftir makreli hevur fingið so stóran týdning fyri føroyska samfelagið, at hon dagliga er ovast á breddanum í fjølmiðlunum.

Minnilutastjórnin, sum sat fram til løgtingsvalið, gjørdi, saman við tveimum andstøðuflokkum, eina langtíðar semju um fiskivinnuna. Við hesi semju fingu vit tilfeingisgjald og uppboðssølu av makrelkvotum.

Ætlanir vóru frammi um eina tilfeingisbúð. Vørurnar til búðina skuldu koma við, at landið ognartók fiskirættindi ígjøgnum eina brúkskyldu.

Nú nýggj stjórn er skipað, er aftur ein heilt annar politikkur settur út í kortið. FSN hevur ikki hugsjónarligar áskoðanir um, hvør politikkur er rættast. Men vit meta, at tað hevur týdning at hava ein stabilan og skynsaman politikk. Tað kemur alt ov ofta fyri, at tey víðgongdu og kollveltandi sjónarmiðini seta dagsskránna.

Í 2011 ásettu Føroyar sær sjálvum eina munandi størri makrelkvotu í mun til árini frammanundan, og mangt bendir á, at støðan verður tann sama í ár.

## MAKRELURIN

Í 2011 varð ásett í lógini, sum skuldi regulera fiskiskapin, at ein treyt fyri fiskiloyvunum varð, at manningin skuldi lønast eftir føroyskum sáttmálum.

Tað eru nøkur skip, sum als ikki hava hildið hesa áseting. Myndugleikarnir hava fingið fráboðan um hesi lógarbrot, men tað tykist als ikki, sum nakar áhugi er fyri hesum. Tað verður víst á, at hetta er eitt arbeiðsmarknaðarmál. Men orsøkin til, at henda treyt stendur í lógini, sum gevur loyvi til fiskiskapin, mundi nettupp vera, at hetta er eitt myndugleikamál.

Tvey av hesum skipum, partrolararnir Beinisvørð og Edna, avroknaðu manningarnar eftir einum ávísum krónutali fyri hvønn dag í sjónum. Manningarfeløgini hava ongan slíkan sáttmála gjørt við hesi reiðarí.

Útlendska verksmiðjuskipið „Franziska" fekk fiskiloyvi eftir eini serligari áseting um, at skip, sum hava verið fyri óhappi, kunnu flyta loyvið yvir á annað skip. Franziska var nærum bert mannað við útlendingum. FSN er ikki vitandi um, hvussu henda manning hevur

verið lønt. Ei heldur vita vit, um henda manning hevur havt neyðuga arbeiðs- og uppihaldsloyvi til at arbeiða á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

### ENDAMÁLIÐ VIÐ KRAVINUM

Endamálið við kravinum um føroyskar sáttmálar man hava verið grundað á, at ongin skuldi kunna luttaka í hesum fiskiskapi undir kappingaravlagandi treytum.

Eisini sóu vit, at tað var bert tað eina móttøkuskipið, sum fekk álagt treytir um partvísa føroyska manning. Samstundis lógu onnur útlendsk skip og innhandlaðu makrel, har ongar treytir vóru settar.

Vit kunnu bert vóna, at hetta óskil og lógloysi ikki sleppur at endurtaka seg í 2012.

Manningarfeløgini kenna tað sum sína skyldu, at steðga sosialari dumping innan føroyskan fiskiskap. Hetta er eisini ein skylda, sum vit hava yvirfyri teimum skipaeigarum, sum virða ásettu spælireglurnar. Hesir eru tíbetur enn teir flestu.

### ALMENNA UPPBOÐSSØLAN

Partur av makrelkvotuni varð seld á almennari uppboðssølu. Nøkur reiðarí hava sett kvotukeyp, sum eina felagsútreiðslu á avrokningina. Hetta hava øll manningarfeløgini mótmælt í felag. Fiskimannafelagið førir hesi sakarmál vegna øll manningarfeløgini. Sáttmálin sigur, at avgjøld kunnu dragast frá søluvirðinum, men ikki keyp av føroyskum fiskirættindum. Eisini hava vit sæð, at makrelur er seldur til móttøkuskip fyri langt undir marknaðarprís. Orsøkin sigst vera, at hetta er eitt slag av gjaldi fyri lán av fiskireiðskapi. Hóast reiðskapur ikki er loyvd útreiðsla, so er tað torført hjá FSN at koma aftur umaftur, tá reiðarin hevur selt fiskin alt ov bíliga. Hetta er eisini eitt mál, sum vit mugu fáa avklárað áðrenn næstu sesong.

Verandi sáttmáli kemur at halda áfram komandi árið. Tað eru bert Nótaskipini, sum hava biðið um samráðingar um sáttmálan. Vit hava havt ein fund við teir, og tað liggur ikki í luftini at gera stórar broytingar.

---

# Strandfaraskip Landsins

Sáttmálin, sum gekk út 1. oktober 2010, varð ikki endurnýggjaður fyrr enn í juni 2011. Talan er um ein eitt ára sáttmála. Neyðugt varð við seming fyri at fáa sáttmálan í hús. Stóra stríðsmálið var, at SSL einvíst hevði sett flestu av limum okkara á niðursetta tíð og harvið eisini niðursetta løn. Tað eydnaðist okkum at fáa eina avtalu um, at hetta í framtíðini bert kann gerast við avtalu við FSN. Allir setanarbrøkar vóru reguleraðir nakað uppeftir.

FSN hevur kravt, at samlaða arbeiðstímatalið skal lækkast frá núverandi 2.548 tímum um árið til 2.400 tímar. Hetta krav er grundað á reglur í Maritime Laubour Convention (MLC 2006). Har er ásett, at sjómenn mugu ikki arbeiða meir enn 8 tímar um dagin í 6 dagar um vikuna.

Harumframt eiga teir frí allar teir almennu halgidagarnar. MLC 2006 sigur, at arbeiðstíðin kann skipast á annan hátt, men ikki verri enn hetta.



Í Føroyum eru 12 frídagar, sum ikki fella á ein sunnudag.

Okkara krav kemur soleiðis fram: 52 vikur á 48 tímar, minus 12 dagar á 8 tímar, sum er 2400 tímar fyri árið.

Nýggj kunngerð um hvílitíð er send til hoyringar og verður lýst í næstum.

Kunngerðin ásetur árliga arbeiðsnormin hjá sjófólki út frá MLC. Nýggja kunngerðin viðførir eisini broyttar reglur um hvíld.

Nú skulu sjómenn hava minst 10 tíma hvíld hvønn dag og í minsta lagi 77 tíma hvíld um vikuna. Tað er møguleiki fyri at víkja nakað frá hesum reglum við kollektivari avtalu.

Um verandi ferðaætlan skal haldast, so verður neyðugt við avtalu um frávik. Hetta er partur av samráðingunum, sum eru ígongd.

## FRIÐARSKYLDA

Tað er javnan frammi í fjølmiðlunum, at útjaðarin ikki kann liva við, at ósemja á arbeiðsmarknaðinum bara rakar tey, sum eru bundin av at ferðast við skipunum hjá Strandferðsluni. Talan er t.d. um tey, sum búgva í Sandoynni og í Suðuroynni.

Meðan tey, sum ikki eru bundin av Strandferðsluni onki merkja til hesi verkføll.

Tað eru mong, sum hava sera sterkar meiningar um hetta álvarsmál. Hugsanir hava verið frammi um at lóggeva soleiðis, at siglingin verður tryggjað.

FSN skilir væl hesi sjónarmið, og vit eru sinnað at gera eina avtalu um eina longri fríðarskyldu. Ein slík avtala má so gerast við tey fakfeløg, sum hava sáttmála við Strandferðsluna.

Men vit krevja, at okkara limir, sum røkja hesa sigling fáa eina hart tiltrongda lønarhækking aftur fyri. Vit hava lagt eitt uppskot fram, sum kann loysa henda trupulleika. Tað gongur í stuttum út uppá, at limir okkara skulu fáa nakað meir enn tann ásetta lønarkarmin, so leingi friðarskyldan stendur við.

Fyri FSN er talan um 27 størv, so kostnaðurin fyri hetta er sera lítil í mun til tað, sum landið fær afturfyri.

Vit hava í dag eina líknandi avtalu fyri skip í frálandavinnu, so hesin trupulleiki er lættur at loysa um vilji er til tað.

Lønardeildin og Fíggjarmálaráðharrin hava víst positivan áhuga fyri okkara uppskoti.



# Rættarmál vegna limir

Tað sera drúgva málið við EIK-Banka, sum yvirtók sjóveðrættar-skyldurnar eftir Nordic skipini er nú endað.



*Ellintur M. Abrahamsen, nevndarlimur*

Rætturin gav okkum viðhald í næstan øllum okkara krøvum. Hesi vóru, at uppspardir frídagar kunnu ikki leggjast í uppsagnartíðini og, at frítíðarløn skal gjaldast av uppsagnarløn og, at limir okkara hava rætt til í minsta lagi 3 mánað uppsagnarfreist. Hetta síðsta merkir, at onnur inntøka í uppsagnartíðini kann bert mótroknast um ein hevur meira enn 3 mánað uppsagnarfreist.

Samlaða upphæddin, sum limir okkara fingu útgoldið var meira enn 1,2 mill. Tó staðfesti rætturin, at tveir av limum okkara einki áttu, tí sjópant ikki var tikið í tí skipinum teir høvdu siglt við. Her er talan um eitt mistak, sum hesir limir vóru púra ósekir í.

Nevndin felagsins hevur valt at halda hesar skaðaleysar og hevur goldið teimum tann hýruágóða, sum teir av røttum áttu. FSN kannar nú um møguleiki er fyri at krevja endurgjald frá triðja parti í hesum máli.

## FAROE SHIP

Rættarmálið móti Faroe Ship, sum noktaði at gjalda limum okkara endurgjald fyri drúgva tænastu sambært § 42 í sjómanslógin er nú endað.

Úrskurðurin var sera greiður. Limir okkara eiga bæði fulla uppsagnarhýru, og endurgjald sambært sjómannalógini. Fýra mans fingu við rentum útgoldið knapt 800 túsund. § 42 í sjómanslógini sigur, at skipsyvirmenn, sum verða uppsagdir eftir ávikavist 12, 15 og 18 ára tænastu eiga endurgjald á ávikavist 1, 2 og 3 mánaðarlønir.

Hesi mál eru góð dømi um, at eitt miðvíst arbeiði frá okkara síðu gevur úrslit. Sjálvt um hesi mál hava verið drúgv, so hava limir okkara fingið gagn av rentuásetingini í sáttmálanum. Hýra, sum ikki verður goldin rættstundis, verður rentað við 1,5% um mánaðin. Fyri hesi málini var rentukravið vorðið størri enn sjálvt hýrukravið.

## MYNSTINGARSKJALIÐ

FSN hevur ført eitt rættarmál vegna ein lim, sum sigldi við einum av smáu trolbátunum. Vit kravdu, at avroknast skuldi eftir kollektiva sáttmálanum fyri trolarar á ísfiskaveiðu. Reiðarin fasthelt, at hann hevði loyvi at avrokna soleiðis, sum hann hevði gjørt í fleiri ár við manningina.

FSN hevur ikki sáttmála beinleiðis við Felagið Trolbátar og tað er sera ymiskt, hvussu bátarnir avrokna, tó hava nakrir fylgt sáttmálanum.

Dómurin segði, at siðvenjan fyri, hvussu avroknað hevði verðið vigaði sera tungt. Tá sami avrokningarháttur hevur verið brúktur í longri tíð uttan mótmæli, so telur tað líka nógv, sum ein undirskrivað avtala. Samstundis segði hann, at um ein sjómaður avroknast øðrvísi enn siðvenja hevur verið, so fellur próvbyrðan yvir á sjómannin.

Tí er sera umráðandi, at allir limir okkara fylla mynstringarskjalið rætt út og vísa til tann kollektiva sáttmálan. Mynstringarlógin hevur eitt krav um, at skrivlig avtala skal gerast, og um talan er um kollektiva avtalu, so skal vísast til hana.

Vegna serligar umstøður, gjørdist hetta málið sera drúgt og kostnaðarmikið. Sjálvt um vit hava tapt hetta málið, so kunnu vit brúka niðurstøðuna í dóminum til okkurt skilagott.

FSN arbeiðir miðvíst fyri, at lóggávan skal tryggja, at allir, sum mynstra til fiskiskap skulu kenna treytirnar, áðrenn mynstrað verður.

# Tilbúgving, samstarv og trygging

Tað hevur fallið mongum fyri bróstið, at virksemið hjá Fiskiveiðieftirlitinum nú verður skert. Tað eina skipið siglir nú bert helvtina av tíðini. Manningarfeløgini umrøddu hetta mál við Jákup Mikkelsen landsstýrismann stutt undan jólum. Hann segði seg harmast um, at hetta stig er neyðugt.

Nú er nýggjur sáttmáli gjørdur við Atlansflog um bjargingartyrluna. Í nýggja sáttmálanum er ásett, at báðar tyrlurnar verða útgjørdar sum bjargingartyrlur.

Nú skal Fiskimálaráðið geva loyvi um onnur tyrlan skal útleigast til annað virksemi.

Fiskimálaráðið arbeiðir við einari áhugaverdari verkætlan, sum kann fáa stóran týdning innan trygd á sjónum. Talan er um eina serliga skipan við fylgisveinaeftirliti til smærri bátar, sum skal royndarkoyrast í vár. Talan er um eina munandi bíligari og einfaldari skipan enn hana, sum størri skip nú hava. Prísurin á nýggju skipanini fer at liggja um 3.000 krónur.

## SAMSTARV VIÐ ONNUR FELØG

Tað eru mong, sum halda, at vit hava alt ov mong fakfeløg í Føroyum. Hetta er helst eisini rætt, men okkara yrkisgrein hevur brúk fyri einum sterkum og virknum felagi. Okkara uppgáva er eisini av fakligum slagi.



*Regin Nónstein, nevndarlimur*



Nevndarlimir fremst frá vinstru: *Ellintur M. Abrahemsen, Johann Jacobsen, Eyðstein Djurhuus, Ólavur Biskopstø.*
Aftast frá vinstru: *Leif Joensen, Regin Nónstein, Annfinn Garðalíð, Leivur Christiansen, Jákup Gøte.*
*Tveir nevndarlimir eru ikki á myndini, teir eru: Andreas Højgaard og Dan Ingi Andreasen.*

FSN skal tryggja, at navigatørar kunnu gera sítt arbeiði innan tryggar lógarkarmar.

Vit eru sannførdir um, at eingin annar uttan vit sjálvir kunnu gera hetta.

Eisini er sera stórur ágangur móti okkara serskipanum, so sum sjómannafrádrátturin og FAS skatturin.

FSN dugir væl at síggja tað skilagóða í, at fakfeløg á sama øki samstarva fyri at náa betri úrslitum.

Manningarfeløgini hava havt eitt gott samráðingarsamstarv. Tíðin er nokk búgvin til, at hetta samstarv verður skipað betur. Millum annað soleiðis, at sáttmálakrøv og samráðingarstrategi verður avtalað í bindandi avtalu.

Samstarvið við Maskinmeistarafelagið um limablað okkara hevur virkað sera væl. Feløgini samstarva nú eisini um samlagstryggingina. Í hesum sambandi skulu vit í felag umsita og hava eftirlit við okkara samlagstrygging. Hetta ber til, tí partarnir hava góðar royndir við at samstarva.

## SAMLAGSTRYGGING

Stórt hall hevur verið í okkara samlagstrygging. Hetta kemst partvíst av, at LÍV ikki hevur megnað at fylgt nóg væl við inngjøldunum. Fyri at fáa javnvág í skipanina er avgjørt at hækka gjøldini nakað. Daggjøldini fyri tey, sum eru við fiskiskipi hækka lutfalsliga meira enn restin. Hetta kemst av, at upprunaliga var gjaldið ásett útfrá 180 døgum umborð um árið. Men nú vísa samanteljingar, at limir okkara í meðal eru 165 dagar umborð.

FSN og MF skulu nú sjálvi fylgja við og tryggja at øll gjøld koma inn. Væntandi fáa vit nú eitt betur eftirlit við skipanini.

LÍV hevur átikið sær hallið, sum hevur verið fram til nú.

## ÚTLITINI Í 2012

Fiskiskapurin eftir botnfiski minkaði nógv í 2011. Vit mugu kortini fegnast um, at prísirnir hava verið hampiligir. Væntandi verður størri roynd í ár. Hvussu fiskiskapur verður vita vit ikki, men vit kunnu bert vóna tað besta, tí væl hevur verið til av smáum seinastu árini.

Einki røkist fyri nakrari semju millum strandalondini um makrelin. Vónandi verður okkara makrelfiskiskapur betri skipaður í 2012 enn hann var í 2011.

Fleiri nýbygningar eru ávegis, sum væntandi verða mannaðir við føroyingum. Alheims búskaparkreppan hevur bitið seg fasta, men okkurt bendir á, at tað kemur at ávirka tann almenna partin av búskapinum mest í komandi árum. Tað er sera torført at meta um, hvussu hetta kemur at ávirka eftirspurningin eftir fiski.

Forsagnirnar fyri farmasigling og frálandavirksemi eru positivar eftir fleiri vánalig ár.

Útlitini hjá limum okkara eru hampiliga góð. Eftirspurningurin eftir væl kvalifiseraðum navigatørum fer at verða stórur í mong ár fram. Tí er sera umráðandi, at vit gera okkara ítasta fyri, at eftirútbúgva og førleikamenna okkara sjófólk.

# Reiðarafelagið kastaði frá sær – einaferð enn

2011 var árið við nógvum órógvi og rumbli innan sáttmálaviðurskiftini hjá fiskiskipunum. Samráðingarnar við Manningarfeløgini endaðu uttan semju. Felagið vrakaði eitt semingsuppskot, tí vit hildu, at uppskotið var alt ov víðgongt í skerjing av okkara rættindum. Reiðarafelagið góðtók sum vera man uppskotið.

## RADIKALT UPPSKOT

Tað undraði okkum almikið, at Semingsstovnurin legði eitt so radikalt uppskot fram. Feløgini høvdu undir øllum samráðingunum boðið okkum til, at gera sáttmála broytingar til fyrimuns fyri reiðaran, har stórir trupulleikar vóru av skjótt hækkandi oljuprísi. Semingsuppskotið hevði tríggjar høvuðsbroytingar, í mun til uppsagda sáttmálan. Býtisprosentini skuldu ásetast, í mun til manningartalið. Eykapartarnir til yvirmenninar skuldi verða eitt fast prosenttal av veiðini, óansæð manningartal. Triðja broytingin var, at ovasti parturin av oljuútreiðslunum skuldi verða loyvd felagsútreiðsla. Manningarfeløgini kundu ikki liva við hesum uppskoti og vrakaðu tað.

## REIÐARAFELAGIÐ LÝSTI VERKBANN

Reiðarafelagið lýsti verkbann, men trupult var at fáa limirnar í Reiðarafelagnum at yvirhalda verkbannið. Manningarfeløgini eggjaðu ikki nøkrum til at bróta verkbannið, men vit kravdu at fáa váttan fyri, at skipini fóru at avrokna manningina eftir tí uppsagda sáttmálanum. Eftir nøkrum døgum, eydnaðist tó Reiðarafelagnum at fáa øll skip at halda verkbannið. Tá umleið tvær vikur vóru gingnar, byrjaðu vit at frætta, at einstøk reiðarí royndu at leggja trýst á limir okkara, til at gera egnar avtalur, sum lógu munandi lægri enn tað sum semingsuppskotið legði upp til.

## TAÐ LEIKAÐI HART Á

Tað leikaði hart á í fleiri førum, men allir limir okkara skulu hava stóra tøkk fyri, at teir bakkaðu okkum upp í hesu torføru støðu. Tað eydnast ikki hjá nøkrum reiðara, at trýsta nakran svika sáttmála ígjøgnum.

Sum tíðin gekk, kom alsamt meir órógv innanhýsis millum reiðarar. Endin varð, at einstøk reiðarí sum høvdu sersáttmála, boðaðu okkum frá, at teir vildu samráðast beinleiðis við okkum. Tá fyrsti sáttmálin varð gjørdur, komu fleiri skipabólkar og bóðu um tað sama.

## ÚTGANGSSTØÐI Í SEMINGSUPPSKOTINUM

Sáttmálarnir, sum vit gjørdu, tóku útgangsstøði í semingsuppskotinum, men við nógv minni hýrulækkingum. Formaðurin og nevndin í Reiðarafelagnum, løgdu kollektivt frá sær og boðaðu frá, at teir mæltu til at annaðhvørt skipabólkarnir ella einstøku reiðaríini vóru fríttstillað til at gera sáttmálar. Hetta líktist nakað somu støðu, sum kom í við eina semingsroynd í 2004. Tá kastaði Reiðarafelagið eisini frá sær og lat tað upp til hvønn skipabólk at samráðast. Fyri manningarfeløgini er hetta ikki nøkur ynskistøða, tá vit ikki hava ein mótpart til at samráðast um felagsreglurnar, sum mugu galda fyri øll skip. FSN vónar, at Reiðarafelagið á ein ella annan hátt finnur stevið aftur. Núverandi støða gagnar hvørki manningum ella skipaeigarum. Umráðandi er eisini, at reiðarar hava eina felags rødd út í almenna rúmið, tá viðurskiftini hjá flotanum skulu umrøðast.

# Jógvan J. Isaksen í Brennideplinum



## ÚTBÚGVING:

Eg gekk nýggju ár í Klaksvíkar skúla. Síðani fór eg í læru á Bedingini í fýra ár. Hetta vóru nøkur sera góð og lærurík ár, sum eg minnist við gleði afturá . Í 1979 fór eg á maskinmeistaraskúla, og tók víðkað maskinmeistaraprógv í 1984.

## VERANDI STARV:

Eg havi arbeitt hjá KBI Sp/f. í knapt fýra ár. Eg fáist mest við at fáa til vega og selja tekniska útgerð o.a. til skip og virkir. Í arbeiðinum havi eg nógv og sera gott samskifti við maskinmeistara o.o. heima og siglandi bæði nær og fjar.

Í 1986 fekk eg eitt avloysarastarv hjá SEV, sum skuldi varða í 10 mánaðir, men tá eg fór úr starvi hjá SEV, hevði eg verið í 21 ár og 10 mánaðir.

## HJÚNAFELAGI:

Eg eri giftur við Mariu Isaksen, sum er fólkaskúlalærari og lesivegleiðari.

## BØRN:

Vit eiga eina dóttur, sum eitur Heidi. Hon er 26 ára gomul og hevur lisið stjórnmálafrøði á University of Glasgow. Síðani eiga vit ein son, sum eitur Jógvan. Hann er 21 ára gamal og hevur gingið á Hægri Handilsskúla á Kambsdali. Í løtuni arbeiðir hann á Bedingini.

## FYRSTU FERÐ TIL SKIPS:

Mín fyrsti túrur til skips var á ísfiskaveiðu undir Íslandi við Ólavi Halga á sumri í 1974. Hetta var samstundis fyrstu ferð eg var uttanlands. Vit høvdu eitt ferðalag frá ÍF uppá 20-30 fólk við yvir til Akureyrar har vit tóku ís. Tá túrurin var liðugur løgdu vit inn á Siglifjørðin, og tóku ferðalagið heim aftur við.

## LONGSTI TÚRUR TIL SKIPS:

Góðan hálvan fjórða mánað í Barentshavinum

## HVØRJUM SKIPUM HEVUR TÚ VERIÐ VIÐ:

Ólavi Halga bæði til fiskarí og vaktartænastu, Froyi á ísfiskaveiðu, Borgaranum á laks, Nónhamri á saltfiska- og ísfiskaveiðu og nógvar avloysaratúrar við Vesturvón til Grimbsby og onkran til Hirtshals.

## STØRSTA AVBJÓÐING HJÁ EINUM MASKINMEISTARA Í DAG:

Hjá teimum eitt sindur eldru er tað at nema sær kunnleika um automatiserings-, regulerings- og teldutøknina.

Hjá teimum komandi maskinmeistarunum er umráðandi, at útbúgvingin framhaldandi kemur at innihalda ein ástøðiligan og ikki minst ein verkligan part, sum er á hædd við tann, ið vit hava havt. Hetta hevur gjørt, at føroyskir maskinmeistarar eru nógv eftirspurdir og avhildnir kring allan knøttin.

## FRÍTÍÐARÍTRIV:

Tað, sum gerast skal við húsini geri eg sjálvur. Mær dámar eisini væl at sparka innandura. Hetta havi eg gjørt líka síðan KÍ høllin kom í 1968. Eg fylgi væl við vodafonliðnum hjá KÍ og fótbólti sum heild í Føroyum. Fylgi eisini eitt sindur við útlendskum fótbólti. Vit samlast í samkomuni Betesda, og har brúki eg nakað av tíð.

## BILUR OG TELDA:

Mitsubishi Lancer, teldurnar eru HP og Dell.

## HVAT KANN GLEÐA TEG Í GERANDISDEGNUM:

Tað er nógv, sum gleðir meg. Tá tað gongst mínum nærmastu væl, tá eg hitti glað og jalig fólk, smábørnini í familjuni, at búgva í einum landi, har so nógv er gott, at hava heilsuna og at hava eina vón.

## HVAT KANN ØSA TEG:

Tað ger onga nyttu, so eg øsi meg sjáldan.

Men tað harmar meg at vera partur av einum fólki, har so nógv halda, at vit ikki kunnu klára okkum, og at nakar við sínum fullu fimm skal finna uppá at hugsa tankan at hækka blokkin.

Eg kann ilskast inn á politikarar, sum ikki tora at taka fatur á teir veruligu trupulleikarnar, tí alt, ið teir gera ella ikki gera, er meir ávirkað av at tekkjast egnum veljaraskara, heldur enn at hugsa um land og fólk.

Fólk, sum bara grenja og fokusera uppá tað neiliga, kunnu fáa meg at gletta á tonn.

# Við tøkk fyri tað farna ynskja vit eitt eydnuberandi nýggjár



FAGRABERG



VESTURVÓN



STAPIN

# Siglandi fólkið stóran týdning fyri okkara samfelag

Fyri tveimum til trimum ártíggjum síðani var talið av siglandi føroyingum væl hægri enn í dag. Fara vit eini 70-100 ár aftur í tíðina, so hevði ein munandi partur av føroysku monnunum sítt dagliga yrki á sjónum, serliga umborð á føroyskum fiskiskipum og útróðrarbátum, men eisini umborð á útlendskum fiski- og handilsskipum.
Hetta var ein tíð, har at kalla øll húski í landinum høvdu ein sjómann í familjuni. Í dag er støðan ein heilt onnur, men siglandi fólkið hevur framvegis stóran týdning fyri okkara samfelagsbúskap.

### SKIPA- OG MANNINGARTAL Í SØGULIGUM HØPI

Ár 1901 búðu 15.230 fólk í Føroyum. Føroyska fiskivinnusamfelagið hevði tá verið í menning í eini 30-40 ár, og hetta sást eisini aftur í talinum av fiskiskipum, sum var vaksið støðugt síðan fyrsta fiskiskipið kom til landið í 1872. Í 1901 vóru tað tilsamans 87 sluppir og skonnartir í Føroyum. Hesi fiskiskip fiskaðu undir Føroyum og Íslandi, og manningarnar taldu tilsamans umleið 2.100 mans. Um hetta mundið vóru umleið 2.000 útróðrarbátar í Føroyum. Tilsamans vóru fiski- og útróðrarmenninir fleiri enn 6.100 í tali í 1901, svarandi til góð 40% av fólkinum.

Føroyska fiskivinnan mentist nógv fyrru helvt av 20. øld. Sluppir og skonnartir, sum fyrr dúvaðu á segl, fingu ísettan motor, og umframt fiskiskap við húki, varð eisini farið at fiska við troli og gørnum. Fiskileiðirnar vórðu samstundis víðkaðar til umframt at fevna um Føroyar og Ísland, eisini at fevna um eitt nú Grønland. Talið av skipum vaks framhaldandi og varð í 1938 komið uppá 169 skip, harav 10 vóru trolarar. Manningarnar við hesum skipum taldu umleið 3.700 mans. Um sama mundið búðu umleið 27.000 fólk í Føroyum. Framhaldandi vóru góð 13% av fólkinum við føroyskum fiskiskipum, tá eru útróðrarmenn ikki taldir við.

*Í 1901 búðu 15.230 fólk í Føroyum. Tá vóru tað tað fleiri enn 6.100 fiski- og útróðrarmenn í Føroyum, svarandi til góð 40% av fólkinum.*

*Í 2011 búðu 48.531 fólk í Føroyum. Av teimum vóru 1.708 fiski- og útróðrarmenn (tá eru tey, sum sigla við fiskiskipum uttanlands ikki tald við), svarandi til umleið 3,5% av fólkinum.*



## SEINNI HEIMSBARDAGI

Undir Seinna Heimsbardaga fórust umleið ein triðingur av føroysku sluppunum og skonnartunum og helvtin av trolarunum. Men árini eftir kríggið var stórur vøkstur í talinum av skipum, og helt hesin vøkstur áfram fram til 1970. Í 1961 vóru tað 265 skip í føroyska fiskiflotanum, talið av sluppum og skonnartum minkaði, meðan talið av trolarum og línuskipum vaks. Manningarnar umborð á skipunum taldu tilsamans 4.353 mans, ella umleið 12,5% av fólkinum – í 1961 búðu tað umleið 35.300 fólk í Føroyum. Verða útróðrarmenn taldir við, so vóru tað tilsamans umleið 7.000 fiski- og útróðrarmenn í Føroyum í 1961, svarandi til smá 20% av fólkinum.

Umframt at føroyingar sigldu við føroyskum skipum, var tað í tíðini eftir Seinna Heimsbardaga vorðið alsamt meiri vanligt, at føroyingar sigldu við útlendskum skipum, bæði við fiskiskipum og við handilsskipum. Føroyingar høvdu tó eisini áðrenn Seinna Heimsbardaga siglt úti í stóru verð. Men vaksandi arbeiðsloysi og lágar inntøkur í Føroyum fyrst í 1950unum gjørdu, at nógvir fiskimenn leitaðu sær kjans umborð á t.d. norskum og íslendskum fiskiskipum. Í 1957 vóru tað umleið 1.400 føroyingar við íslendskum skipum, meðan 178 vóru við norskum skipum. Eftir hetta minkaði talið og í 1961 var talið av føroyingum við norskum skipum 139, meðan tað sama árið vóru umleið 300 mans við íslendskum skipum.

> MENNINGIN AV FØROYSKA SAMFELAGNUM HEVUR SÍÐAN Í 1970UNUM VERIÐ MERKT AV, AT ALSAMT FLEIRI FÓLK ERU FARIN AT ARBEIÐA INNAN ALMENNAR TÆNASTUR OG FYRISITING, OG Í PRIVATU HANDILS- OG TÆNASTU-VINNUNUM, MEÐAN TALIÐ AV FÓLKI INNAN FISKIVINNUNA Á SJÓGVI OG LANDI ER MINKAÐ.

## 227 FISKISKIP Í FØROYUM

Miðskeiðis í 1970unum vóru tað 227 fiskiskip í Føroyum, men flotin var tá eisini í vaksandi mun farin at fevna um onnur skip, t.d. ferðamannaskip, farmaskip og sandbátar (ferðamannaskip og farmaskip hava tó verið partur av føroyska flotanum síðan fyrst í 1900talinum). Í mun til 30-40 ár frammanundan, so fevndi flotin í 1975 í stóran mun um nýggjari skip. Gomlu sluppirnar og skonnartirnar vóru munandi færri í tali, meðan nýbygd stállínuskip, trolarar, nótaskip og ídnaðartrolarar komu í staðin. Av teimum 17 skipunum, sum komu í flotan í 1975 vóru 14 nýbygd.

Hóast talið av skipum vaks, so minkaði talið av monnum, sum høvdu fiskiskap og útróður sum vinnuveg frá miðskeiðis í 1960-unum fram til 1977. Í 1966 vóru tað umleið 8.950 mans, sum høvdu fiskiskap og útróður sum vinnuveg. Í 1977 var talið minkað niður í 7.533. Í 1966 búðu 37.122 fólk í Føroyum, og høvdu tá umleið 24% av fólkinum sín vinnuveg sum fiski- ella útróðrarmenn. Í 1977, tá 41.969 fólk búðu í Føroyum, var talið minkað niður í smá 18%.

## FØROYSKI FLOTIN MENNIST NÓGV

Frá miðskeiðis í 1970unum og fram til 1990 mennist føroyski flotin nógv. Talið av stórum skipum (trolarum, stállínuskipum, nótaskipum og øðrum stórum fiski-

skipum) vaks frá 115 skipum í 1975 til 151 skip í 1990. Men minkingin í talinum av sjófólkum, sum longu varð byrjað miðskeiðis í 1970unum helt áfram. Í 1990 vóru tað 2.719 fólk í Føroyum, sum høvdu fiskiskap sum vinnuveg. Afturat hesum koma 618 fólk, sum vóru í vinnu innan sjóflutning.

Tilsamans var talan um 3.337 fólk ella smá 7% av Føroya fólki (í 1990 búðu 47.770 fólk í Føroyum), ið høvdu sín vinnuveg á sjónum, í mun til smá 18% í 1977.

Góð 20 ár seinni, í 2011, er talið av føroyingum, sum hava fiskiskap og sjóflutning sum vinnuveg minkað niður í góð 5% av fólkatalinum, ella tilsamans 2.489 fólk. Í mun til í 1990 eru tað í 2011 fleiri enn 1.000 fólk færri í vinnu innan fiskiskap, meðan tað var ein vøkstur á 160 fólk, sum eru í vinnu innan sjóflutning.

> TAÐ ER IKKI ÓVANLIGT, AT SJÓFÓLK, SUM SIGLA Í ØÐRUM LONDUM, ERU BURTURI 1 MÁNAÐ (ELLA STYTTRI) OG HEIMA 1 MÁNAÐ, OG FÁA LØN BÆÐI MEÐAN TEY ERU HEIMA OG BURTURI.

## FØROYINGAR VIÐ ÚTLENDSKUM SKIPUM

Talið av sjófólkum í brotunum omanfyri fevnir um føroysk sjófólk, sum eru skattaði í Føroyum, t.v.s. partur av almennu arbeiðsmarknaðarhagtølunum í Føroyum. Men seinastu 10 árini er eitt vaksandi tal av føroyingum farnir at sigla við útlendskum skipum, og verða hesir tá í flestu førum løntir undir skattaskipanir, sum Føroyar hava avtalað við onnur lond. Dømi um hetta eru danska DIS-skipanin og norska NIS-skipanin, men harumframt eru eisini millumlanda skattaavtalur við t.d. Grønland og Kanada.

Í 1988 sigldu 714 føroyingar undir hesum skipanum. Men seinastu árini hevur verið ein støðugur vøkstur í talinum av føroyingum, sum sigla uttanlands. Í 2008 vóru tað 961 føroyingar, sum sigldu undir DIS, NIS ella í Grønlandi og Kanada.

Ikki hevur borið til at fáa hesi tøl dagførd frá TAKS, m.a. orsaka av broytingum í skrásetingunum hjá TAKS. Og tað er eitt sindur harmiligt, tí hetta er ein týðandi partur av okkara arbeiðsmarknaðarhagtølum, sum sambært TAKS ikki kunnu trekkjast úr skipanini. Hóast øll tølini ikki eru tøk, so er talið av DIS'arum tó tøkt. Í 2010 vóru tað tilsamans 466 føroyingar, sum sigldu undir DIS. Hetta er nakað lægri enn í 2008, tá talið var 512, men hinvegin hægri enn árini 1998-2007, tá talið lá millum sløk 400 og góð 450.

## MODERNISERING AV SAMFELAGNUM OG FØROYSK SJÓFÓLK

Hóast talið av føroyingum, sum sigla í øðrum londum, seinastu tvey ártíggjuni er vaksið, so er samlaða talið av føroyskum sjófólkum støðugt minkað seinastu ártíggjuni. Tað eru fleiri orsøkir til hesa gongd.

Menningin av føroyska samfelagnum hevur síðan í 1970unum verið merkt av, at alsamt fleiri fólk eru




*Talið á útróðrar- og fiskimonnum er minkað í stórum seinastu árini. Í 2004 vóru teir 2.567 og í 2010 1.769.*

farin at arbeiða innan almennar tænastur og fyrisiting, og í privatu handils- og tænastuvinnunum, meðan talið av fólki innan fiskivinnuna á sjógvi og landi er minkað.

Í nógvar mátar er talan um eina natúrliga gongd í mun til menningina av samfelagnum. So hvørt sum samfelagið mennist, mennast amboð, tilboð og tænastur, og fólk og vinna skapa eisini annan tørv, seta onnur krøv í gerandisdegnum enn fyrr.

Taka vit t.d. fiskivinnuna, so hevur hon flutt seg frá einari støðu, har stórur partur av arbeiðinum fyrr var merkt av handaligum arbeiði, bæði umborð á fiskiskipunum og á fiskavirkjunum á landi, til eina støðu í dag, har alsamt størri partar verða gjørdir av maskinum, umframt at menning av reiðskapinum umborð ger, at tørvurin á fólki ikki er hin sami. Hóast nøgdirnar av fiski eru nøkulunda tær somu, so er tørvurin á fólki bæði á virkjum og umborð á skipum minkaður, harumframt er talið av fiskiskipum í føroyska flotanum minkað seinastu árini.

Umframt menning av maskinum og reiðskapi, so hevur rákið í samfelagnum eisini í stóran mun lagt upp til, at ungdómurin skal velja annan vinnuveg enn fiski- og sjóvinnuna. Rákið í samfelagnum seinastu ártíggjuni hevur verið merkt av, at øll skulu fáa sær útbúgving. Ein lítil partur velur útbúgvingarveg, sum gevur møguleika at gerast yvirmaður á sjónum, meðan tey flestu velja aðrar leiðir. Ein av orsøkunum til hesa gongd er, at føroyski ungdómurin í dag í stóran mun fær síni inntrykk frá parabol-sjónvarpsrásum og internetinum, og har er streymurin lítið merktur av fiskivinnu- og sjóvinnusamfelagnum, vit liva í. Tí hevur fiski- og sjóvinnan eisini lítlan áhuga hjá ungdóminum.

## TÝDNINGARMIKIL PARTUR AV OKKARA ARBEIÐSMARKNAÐI

Hinvegin eru tað tó framvegis fleiri menn og kvinnur í Føroyum, sum velja sjóvegin. Til dømis er tað nógv, sum bendir á, at talið av føroyingum, sum sigla við supply- og vaktarskipum innan oljuvinnuna er vaksandi. Lønin er góð, og umstøðurnar til eitt gott arbeiðs- og familjulív innan hesa vinnu, eins og umborð á flestu útlendskum skipum, eru góðar. Har tað fyrr var vanligt, at sjómenn vóru burturi í mánaðir og hálv ár í senn, so hava sjófólk í dag heilt onnur arbeiðskor. Tað er ikki óvanligt, at sjófólk, sum sigla í øðrum londum, eru burturi 1 mánað (ella styttri) og heima 1 mánað, og fáa løn bæði meðan tey eru heima og burturi. Hesa broyting síggja vit eisini umborð á fleiri føroyskum fiskiskipum, tó talan enn bert er um lítlan part av flotanum, sum bjóðar hesi arbeiðskor.

Hesar broytingar skapa betri møguleikar fyri einum familjulívi, sum vit kenna tað anno 2012, har krøv verða sett til, at bæði foreldrini í so stóran mun sum gjørligt eru partur av gerandisdegnum hjá familjuni – í mun til fyrr, har kynsbýtið í flestu førum var, at kvinnurnar aldu upp børnini, meðan menn vunnu til lívsins uppihald. Við hesari broyting stendur hesin vinnuvegurin ikki veikari í kapping við aðrar vinnuvegir, um hugsað verður um møguleikarnir fyri einum góðum familjulívi. Og hetta hevur týdning í tí modernaða samfelagnum!

Okkara siglandi fólk hevur framvegis stóran týdning fyri samfelagsbúskapin. Gamaní er talið av sjófólkum minkað nógv, men týdningurin av at hava siglandi fólk bæði her heima og úti í stórur verð eigur ikki at undirmetast. Arbeiðsmarknaðurin hjá siglandi fólki úti í heimi er ikki ávirkaður av, hvussu gongdin er í fiskastovnum og prísum ella beinleiðis knýttur at øðrum innanlendis viðurskiftum í Føroyum. Tískil hevur hesin parturin av okkara arbeiðsmarknaði verið og er framvegis eitt týðandi íkast til, at vit megna at hava eitt høgt livistøði í Føroyum.

## KELDUR:


1. Erlendur Patursson, 1961: „Fiskiveiða - Fiskimenn 1850-1939“, Føroya Fiskimannafelag.
2. Erlendur Patursson, 1979: „Fiskivinna og fiskivinnumál 1940-1970, 1. Bind“, Føroya Fiskimannafelag.
3. Magni Laksáfoss og Dennis Holm, Føroysk sjófólk, sum sigla í øðrum londum, Arbeiðsrit 22/2009, Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning.
4. Ársfrágreiðing fyri Føroyar 1975, Føroya Landsstýri og Ríkisumboðsmaðurin í Føroyum.
5. 5) Hagstova Føroya




*Tekstur: Dennis Holm*




**Við ynskjum um eitt eydnusamt nýggjár takkar Norðborg fyri farna árið**



*Fundur á skrivstovuni hjá ITF, har føroysku manningarfeløgini luttóku*

# FAS lýst sum hentleikaflagg av ITF

ITF hevur síðan 1948 ført eina Flag Of Convenience (FOC) kampanju. Endamálið er at forða fyri, at reiðarar flyta síni skip í aðrar skipaskráir fyri at sleppa undan ávirkan frá fakfeløgum ella fyri at dumpa lønarlag og trygdarstøði. Fyri fløgg á FOC listanum liggur samráðingarrætturin hjá fakfeløgum í upprunalandinum hjá skipinum ella reiðarínum. Sáttmálarnir skulu gerast saman við fakfeløgum í heimlandinum hjá sjómonnum. Norsk Sjømans Union, Seko úr Svøríki og CO Søfart úr Danmark heittu á ITF um at seta FAS á FOC listan, tí reiðarí úr teirra londum hava ella ætla at skráseta mong skip í FAS.

## MANNINGARFELØGINI HAVA ROYNT AT ÁVIRKA

Fyri at kunna ITF um føroysk viðurskifti hava Fiskimannafelagið, Maskinmeistarafelagið og Skipara- og Navigatørfelagið verið á fundum við ITF í London. Endamálið við fundunum var at gera eina roynd at byrgja fyri, at ITF setti FAS á FOC listan.

Hóast royndirnar hjá feløgunum hevur ITF sett FAS á FOC listan.

ITF hevði tvær grundgevingar fyri hesi avgerð. Tann fyrra er, at fyri meir enn 50% av skipunum liggur veruligi ognarskapurin av skipunum ikki í Føroyum. Seinna grundgevingin er, at føroyska FAS lógin forðar føroysku manningarfeløgunum í at gera kollektivan sáttmála fyri útlendskar sjómenn við FAS skipum. Hetta er greitt brot á ILO konventiónina um rættin hjá sjómonnum til kollektivan setanarsáttmála.

## IKKI BARA ILLVILJI

Talan er sostatt um, at FAS heilt greitt uppfyllir treytirnar hjá ITF fyri FOC fløgg. Vit skulu ikki tulka hesa avgerð, sum illvilja frá fakfeløgum í grannalondunum. Heldur er talan um, at tey vilja tryggja sær sín sjálvsagda samráðingarrætt.

ITF hevur brúkt nærum eitt ár um at viðgera hetta mál. FAS er ein

samansett skipaskrá, sum hevur bæði føroysk og „útlendsk" skip. Í løtuni eru 40% av skipunum upprunaliga føroysk. Tað hevði eisini stóran týdning, at so stórur partur av manningum á FAS skipunum eru føroyingar.

ITF gjørdi av, at tey skip sum føroysk reiðarí eiga, og tey fremmandu skipini, sum føroyingar manna verða ikki mett sum skip undir hentleikaflaggi. Sostatt fær hendan avgerðin ikki nevniverda ávirkan fyri føroysku manningarfeløgini.

### MANNINGARFELØGINI HØRM

Føroysku manningarfeløgini eru sjálvandi hørm um at hendan støðan er íkomin, og vit høvdu eitt annað tilmæli til ITF. Vit ráddu til, at einstøk skip ella reiðarí vóru lýst sum FOC, hetta kann gerast sambært ITF reglugerðini.

Hóast vit høvdu nakað av undirtøku fyri okkara uppskoti, so helt meirilutin, at tað sendi ein greiðari politiskan boðskap at lýsa alt FAS sum FOC flagg. Ein innanhýsis arbeiðsbólkur í ITF verður settur at fylgja gongdini í FAS. Serliga skal fylgjast við støðuni viðvíkjandi samráðingarrættinum í FAS lógini. Eisini skal fylgjast við um innflaggingin í FAS heldur áfram við somu fer.

Greiða skal eisini fáast á um reiðarar fáa óvanliga góðar skattasømdir í FAS. Arbeiðsbólkurin, sum føroysku feløgini eisini verða víð í, skal innan eitt ár boða frá um eventuellar broytingar, sum kunnu geva grundarlag fyri at taka FAS burtur av FOC listanum aftur.

### FØROYSKA FLAGGIÐ ER KORTINI HVÍTT HJÁ IMO

Fleiri av heimsins størstu skipaskráum eru á FOC listanum og flestu av teimum eru á hvíta listanum hjá IMO. Hetta er eitt yvirlit yvir tey lond, sum klára seg best í Port State Control av skipum. Vit skulu undirstrika at FOC listin hjá ITF bert er eitt amboð til at definera hvar samráðingarrætturin skal liggja. Sostatt kunnu lond, sum eru á hesum lista saktans hava eina dygdar sjóvinnu.

---

# Ikki pláss til allar í Føroyum

Felagið Føroyskir Fiskimenn Uttanlands varð stovnað 21. apríl 1995. Vit vóru m.a. við í tilgongdini um sjómannafrádráttin hvørs endamál var, at vit kundu fáa somu skipan, sum teir vit vóru á dekki saman við, greiðir Høgni Waag Høgnesen frá.

Vit sum sigla við fiskiskipum í øðrum londum rinda skatt til Føroyar eins og onnur í vinnu her á landi.

Eina tíð høvdu vit eina vælvirkandi skipan við einum V-tali, sum javsetti okkum við føroyskar lønmóttakarar. Hetta avtók TAKS hin 1. januar 2011. Síðani hevur bert verið ruðuleiki, hóast vit ávaraðu TAKS, Fíggjarmálaráðið, landsstýrismannin í fíggjarmálum og løgtingsmenn.

Hetta kann fáa fatalar avleiðingar bæði fyri skattaborgaran og fyri landskassan. Royndirnar vísa, at við størri umsiting er torførari at fáa pening í føroyska landskassan.

### OV NÓGVAR SKIPANIR

Nú finnast so nógvar skipanir, at ilt er at finna fram til hvørjar skipanir dekka hvønn lønmóttakara.

Tað er eisini ein trupulleiki at kunngerðir og reglugerðir vera broyttar ofta og títt.

Tað seinasta, sum TAKS er komið við er at skatta ferðaseðlar sum frían ágóða. Hetta er straffur fyri at fara uttanlands at vinna til lívsins uppihald. Vit eru føroyingar, sum ikki ynskja at flyta úr Føroyum.

Felagið hevur javnan verið í sambandi við myndugleikarnar, manningarfeløgini og áhugafeløg. Endamálið hevur verið at kunna møtast til ein fund har vit fáa greiðu á hesum viðurskiftum.



*Nevndarlimir frá vinstru: Jens A. Zachariasen, Høgni Waag Høgnesen, formaður, Jákup Suni Jacobsen, næstformaður, Bennie Højgaard, tiltakslimur.*

## SAMLA UMSITING

Vit hava lagt upp til, at man samlar alla umsiting á einum stað so teir, sum hava ætlanir um at fara í vinnu uttanlands kunnu avgreiða øll skjøl og váttanir við einari vitjan heldur enn at fara á 6 ymiskar skrivstovur, og órógva nógv almenn starvsfólk.

Vit hava t.d. fleiri ferð vent okkum til avvarðandi myndugleikar fyri at fáa greiðu á eftirlønarviðurskiftum hjá sjófólki uttanlands. Tað er møguligt at loysa trupulleikan, tá føroysk starvsfólk møtast í norðurlendskum høpi, men enn er ikki komið á mál.

Tað hevur stóran skund at fáa tey, sum stýra hesum landi at seta seg inn í hesi viðurskifti, heldur enn at koma við hugskotum, ið ikki kunna brúkast.

Man kann ikki bara seta tilvildarligar reglur í verk uttan at fara til rætta viðkomandi í Danmørk ella Norra, tá trupulleikin liggur har.

Tað vísir seg, at trupulleikarnir ikki liggja hjá lønmótakarunum; hesin er bert farin til verka í einum øðrum landi, tí ongin møguleiki er í Føroyum.

## INNBODNIR GESTIR

Gestir á fundinum vóru Sólrun Olsen frá TAKS, Jan Danielsen frá Heilsutrygd og Torgerð Nielsen frá Almannastovuni.

Sólrun Olsen greiddi frá serliga V-talinum, sum var komið aftur at virka. Og nú er bert eitt V-tal fyri allar, sum sigla uttanlands hvørs inntøka er B inntøka. Onnur gjøld verða avroknað við ársuppgerð. Eisini kom fram at Bonus fyri 2011 kann skattast í 2012.

Jan Danielsen greiddi frá Heilsutrygd, sum dekkar Norðurlond og U.K.

Torgerð Nielsen greiddi m.a. frá sonevndu N101 váttanini, sum skal brúkast um man siglir í Norra, og skal søkja um at sleppa undan at gjalda norsku „Folketrygden"; sum svarar til føroysku „Heilsutrygd".

Teir, sum hava brúk fyri N101 váttanini kunnu heinta hana á heimasíðuni hjá Almannastovuni: www.almannastovan.fo

# BROT ÚR DAGBÓK

**30. september: Fíggjarmálaráðið**
Sáttmálasamráðingar við Lønarsdeildina, partarnir leggja krøvini fram.

**3. oktober: Oslo**
Manningarfeløgini hitta Norsk Sjømansforbund, tosað verður um ætlanirnar at lýsa FAS sum eitt hentleikaflagg. Vit vitjaðu eisini Maskinistforbunde og Sjøofficersforbundi. Norsku manningarfeløgini húsast øll undir sama takið miðskeiðis í Oslo.

**5. oktober: Fíggjarmálaráðið**
Samráðingarfundur, Lønardeildin boðar okkum frá, at ongin sáttmáli verður undirskrivaður fyrr enn nýtt landsstýrið er skipað.

**6. oktober: ALS**
Stýrisfundur í Trygdargrunninum. Útgjøldini til inntøkutrygd hava verið nógv minni enn vænta. Grunnurin fer at hava stórt avlop í rakstrinum fyri 2012.

**13. oktober: FSN**
Antares heldur nevndarfund hjá FSN, teir fyrireikaðu seg til fund við TAKS, sum skuldi verða seinni um dagin.

**18. oktober: MF**
Fundur í FMU, fyrireiking til ITF fund í London

**28. oktober. ITF, London**
Manningarfeløgini eru innkallaði til at umrøða kæru av FAS. Nú er danska felagið CO- Søfart eisini partur av kæruni. Teir óttast, at donsk ferjureiðarí fara at flyta til FAS.

**1. november: Vinnuháskúlin**
Minningarhald teirra sjólátnu, Løgmaður og Biskupur høvdu orðið. Sera nógvir næmingar á skúlanum vóru við til løtuna.

**10. november: FSN**
Umboð fyri Svtzer vilja hitta FMU nú vandi er fyri, at FAS verður lýst sum hentleikaflagg.

**14. november: FF**
Fiskimannafelagið hevur 100 ára føðingardag. FSN handaði teimum eina gávu, og ynsktu teimum góðan byr. Væl av fólki var samankomið til móttøkuna.

**16. november. ITF London**
FMU er innkallað til fund i Fair Practisess Commttee, sum skal taka støðu til um FAS skal á listan yvir hentleikafløgg. Umleið 80 fólk úr øllum heiminum vóru á fundi.

**17. november: Starvsmannafelagið**
Fakfeløgini skipa fyri fundi við andstøðuna í Løgtinginum. Til viðgerðar er skatting av pensjónum við inngjaldi og flatskattaskipanin. FSN boðar hinum feløgunum frá, at vit luttaka ikki í tiltøkum saman við politisku flokkunum.

**18. november. Portugálið**
Fundur í Samstarvsráðnum um trygd á sjónum. Ráðið mælir til, at vit innføra okkurt slag av fylgisveinaeftirliti fyri smærri bátar.

**29. november. FSN**
Nevndarfundur, fyrireikingar til aðalfundin, og roknskapurin hjá FSN

**7. desember Argir**
Samráðingarnar við Lønardeildina verða tiknar upp aftur. Jørgin Niclasen er við á fundi, FSN boða frá, at vit eru sinnaðir til at finna eina skipan, sum kann verja Strandferðsluna móti verkføllum.

**8. desember: ALS**
Fundur í Trygdargrunninum, væntaða avlopið hjá grunninum verður umleið 9 mill. Samlaðu inngjøldini inn í grunnin verða uml. 20 mill. Skipini gjalda 1% av søluni inn, hetta merkir, at tey hava avreitt fyri 2 mia. í 2011.

**9. desember: Portugálið**
Vinnumálaráðið skipar fyri hoyringsfundi um nýggja kunngerð um hvíld hjá sjófólki.

**12. desember: Hafnia**
Lívstrygging kunnar fakfeløg um ætlaðar broytingar. Ætlanin er at sleppa skipanini við rentugaranti.

**14. desember: Løgtingið**
Vinnunevndin vil hoyra áskoðanina hjá FSN um broytingar í semingslógini, og lógaruppskot um at verja SSL móti verkføllum.

**15. desember: FSN**
Nevndin hittist til seinastu fyrireikingarnar áðrenn aðalfundin.

**16. desember: Hotell Føroyar**
FF heldur 100 ára veitslu undir

borðhaldinum hevði Torbjørn Jacobsen eina áhugaverda hugleiðing.

**20. desember: Fiskimálaráðið**
Manningarfeløgini hitta Jákup Mikkelsen, ráðharra. Feløgini vísa á, at ein fortreyt fyri fiskiloyvi má vera, at kollektivu sáttmálarnir verða hildnir. Eisini varð tosað um tilbúgvingina, nú annað vaktarskipið bert kemur at sigla helvtina av árinum.

**28. desember: Hotell Føroyar**
FSN heldur aðalfund, umleið 50 limir komu á fund. Vit fegnast um at nógvir, sum ikki fyrr hava verið á fundi vóru við hesaferð. Ben Arabo frá Atlantic Petroleum, helt ein góðan fyrilestur um oljuleiting og framleiðslu.

**6. januar: Fiskimálaráðið.**
Fiskivinnuráðið viðgerð uppskot um at víðka heimildina til bráðfeingis veiðubann.

## FELAGIÐ OG NÝGGJA ÁRIÐ

Aðalfundur hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag liggur síðst í desember mánað, og er eitt gott høvi at líta aftur eftir, hvat farna árið hevði at bjóða.

Hetta er eisini eitt gott høvi at hyggja frameftir og hugsa um, hvat vit hava í væntu í 2012.

Jan Kristoffersen, nevndarlimur, ynskti ikki afturval á aðalfundinum. Vit takka honum fyri tey seks árini hann hevur sitið í nevndini.

Andrias Højgaard er nývaldur í nevndina. Vit fegnast um at ungir menn eisini hava áhuga í felagsarbeiðinum. Nevndin hevur skipað seg við sama formanni og næstformanni.

Fyrsta stórmálið í 2012 eru sáttmálasamráðingarnar við Fíggjarmálaráðið. Felagið hevur lagt eitt uppskot fram um eina fimm ára friðarskyldu fyri Strandfaraskipini. Afturfyri skulu limir okkara fáa eina hart tiltrongda lønarhækkan. Fyri útjaðaran í Føroyum hevur tað stóran týdning, at siglingin ikki verður rakt av verkfalli. Felagið hevur 27 limir sum sigla hjá SSL, so kostnaðurin av einari friðarskyldu er sera avmarkaður fyri tað almenna. Um partarnir bera seg skilagott at, so kunnu báðir partar fáa stóran fyrimun av eini avtalu, sum tryggjar siglingina í eitt longri tíðarskeið.

Samráðingar verða ikki fyri farma- og frálandaskip í 2012. Vit fáa alsamt fleiri limir á hesum øki. Her er talan um nýggj størv, sum bæði gagna sjómanninum og øllum samfelagnum. Vit duga ikki nóg væl, at virðismeta framgongdina í okkara FAS skipan. Seinastu árini hevur stór niðurgongd verðið í limatali innan fiskiskap, men framgongdin í FAS hevur vigað upp ímóti.



*Eyðstein Djurhuus, formaður felagsins*

Føroya Skipara- og Navigatørfelag setur sítt álit á, at makrelfiskiskapurin í 2012 verðu betur skipaðu enn í 2011. Rættast er nokk at býta kvotuna út til einstøku skipini. Hava reiðarar so hug at selja kvotuna, so mugu teir hava í huganum, at kvotukeyp er **ikki** loyvd felagsútreiðsla í avrokningini.

Nú eru nýggjar hugsanir at hoyra frá Havstovuni. Nú verður mælt til at hava somu fiskidagar í nøkur ár fyri at síggja, hvussu skerjingarnar í 2011 virka. FSN fegnast um, at vit umsíðir kanska fáa eina meira skynsama umsiting av fiskarínum við Føroyar.

## BROT ÚR DAGBÓK

**22-09-2011: MF**
Fundur millum FMU, Reiðarafelagið fyri farmaskip og FAS umsitingina. Fundurin snúið seg um skriv til ITF, eitt sokallað „Letter of Intent“.

**27-09-2011: Portugálið.**
Fundur í Sjóvinnuráðnum um dispensation til M/S Karoline.

**03-10-2011: Norsk Sjømannsforbund í Oslo**
Fundur um norsku ákæruna móti okkum at fáa tað føroyska flaggið á FOC.

**06-10-2011: ALS- húsið**
Fundur í Trygdargrunni Fiskivinnurnar. Á skráni m.a.: Rakstrarroknskapur, røkt og kunning um ymisk hagtøl.

**13-10-2011: MF**
Á fundinum luttóku umboð fyri FAS, RFF og FMU. Støðan eftir, at FMU hevur haft fund við SEGO og Norsk Sjømansforbund. Umrøtt varð eisini skriv, sum manningarfeløgini fara at senda ITF, og hugtakið „ship by ship“.

**18-10-2011: MF**
Fundur í FMU: Fyrireikingar til komandi fund við í ITF í London.

**26-10 2011: Runavík**
Undirskrivaðu sáttmála millum Sp/f Frakt og Sandsøluna og Maskinmeistarafelagið.

**28-10-2011: Fundur hjá ITF í London**
Til staðar vóru umboð fyri ITF, Norsk Sjømansforbund, Seko Co- søfart og FMU. Umboð fyri FMU visti á okkara fundir við myndugleikarnar og við norðurlendsku feløgini. Viðvíkjandi lóggávuni er semja um at gera broytingar.

**03-11-2011: MF**
Fundur millum FAS og FMU um at lýsa FAS sum hentleikaflagg. Tosað varð millum annað um, hví norðurlensku manningarfeløgini eru so altrá eftir at lýsa FAS sum FOC flagg. Norðmenn síggja FAS sum eitt álop á teirra arbeiðsmarknað serliga innan strandasigling.

**04-11-2011: MF Nevndarfundur**
22 mál á skránni. Millum annað 6 umsóknir um stuðul, kvotukeyp, manningartal og aspirantskipan, samlagstrygging og komandi sáttmálasamráðingar.

**07-11-2011: Arbeiðskvinnufelagið**
Fundur um skatting av eftirløn.

**10-11-2011: MF**
Fundur millum SVITZER og FMU. Umboð fyri SVITZER greiddi frá teirra trupulleikum við at fáa sáttmála við SEKO.

Umboð fyri FMU greiddi frá málinum í ITF um at lýsa FAS sum FOC.

**16-11-2011: London**
Umboð fyri FMU vóru á fundi og møttu limum í FPC, 70 fólk vóru á fundinum.

Umboðini fyri FMU greiddu frá meiningini hjá FMU. Millum annað at 72% av skipunum í FAS eru føroysk ogn og 40% av manningunum býr í Føroyum. Heitt bleiv á ITF um at stuðla okkum heldur enn at høtta okkum.

FPC boðaði frá, at eftir at hava viðgjørt málið, fóru teir at lýsa FAS sum hentleikaflagg 1. desember 2011.

**25-11-2011: MF**
Nevndarfundur: Tólv mál á skránni. Millum annað eftirmeting av samskiftinum við ITF, sáttmálaviðurskifti á fiskiskipum, nøkur persónsmál og samlagstryggingin nú MF og FSN yvirtaka umsitingina av tryggingini.

**29-11-2011: FF**
Eftirmeting av arbeiðinum millum FMU og ITF um hentleikaflagg. Arbeiðið hevur verið langt og hevur tikið nógva arbeiðsorku hjá feløgunum. Men semja var um at haldast skuldi fram til øll skip eru dekkað av sáttmálum og, at FMU fær samráðingarrættin samsvarandi ILO- sáttmálanum.

**30-11-2011: Fuglafjørður**
Undirskriva sáttmála millum P/F Sandgrevstur og MF.

**30-11-2011: Norðurlandahúsið**
Fundur, sum Fakfelagssamstarvið hevði skipað fyri, fullsett var í stóra salinum.

Fundurin snúði seg um hvørja ávirkan samgonguskjalið fer at hava fyri løntakarar.

**01-12-2011: FSN**
Undirskriva avtalu millum MF og FSN um høvuðsreglur fyri umsiting og mannagongdir í sambandi við innkrevjing av limagjaldi til samlagstrygging fyri limir í feløgunum.

**08-12-2011: Trygdargrunnurin**
Nevndarfundur í hølunum hjá ALS. Á skránni var m.a. fíggjarætlan fyri 2012 og rakstrarroknskapur.

**09-12-2011: Portugálið**
Fundur um hvílutíð hjá sjófólki. Hetta er í sambandi við, at broytingar vera gjørdar í STCW-sáttmálanum so, at hesin samsvarar við

regluna um hvílutíð í MLC-sáttmálanum.

**12-12-2011: Hotell Hafnia**
Kunnandi fundur um, hvat komandi ár kemur at innibera hjá kundunum hjá Lív.

Johnny í Grótinum hevði framløgu um avbjóðingar hjá LÍV sum eftirlønarfelag.

**20-12-2011: Fiskimálaráðið**
Manningarfeløgini høvdu fund við nýggja fiskimálaráðharran um fiskiloyvir og sáttmálarnar hjá feløgunum. Víst varð m.a. á óskilið, sum var í makrelveiðini. Prátað varð millum annað um støðuna í fiskivinnuni sum heild. Tosað bleiv nakað um trygdina á sjónum. Semja var um, at tað ber ikki til at samanbera okkara tilbúgving við ta norsku.

**20-12-2011: Fiskimannafelagið**
Manningarfeløgini høddu fund við felagið Nótaskip og umboð fyri Norðborg. Felagið Nótaskip hevur sagt avtaluna upp við manningarfeløgini. Semja var um at hittast aftur eftir nýggjár og at verandi avtalur halda fram fyribils

## SÁTTMÁLASAMRÁÐINGARNAR

Sáttmálasamráðingarnar millum Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið øðrumegin og Maskinmeistarafelagið hinumegin byrjaðu um mánaðarskifti september/oktober. Í fyrsta umfari vóru 3 fundir millum Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarafelagið. Á hesum fundum fekk Maskinmeistarafelagið m.a. upplýst, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum Aksel V. Johannesen hevði bjóðað fakfelagssamtakinum eina lønarhækking upp á 1,2 % um árið yvir 2 ár.

Men tá løgtingsvali varð útskrivað kom støðgur í samráðingarnar.

Fyrsti fundur eftir løgtingsvalið var 25. november 2011. Tá boðaði Fíggjarmálaráðið frá, at nýggi landsstýrismaðurin í fíggjarmálum vildi hava lønirnar lækkaðar afturfyri skattalætta.

Kravið hjá Maskinmeistarafelagið var, at lønin skuldi hækkað 1. oktober 2011 við 2,9 % og aftur 1. oktober 2012 við 3,4 %.

Fíggjarmálaráðið boðaði 6. desember 2011 frá, at tað kravdi ein lønarniðurskurð upp á 4 %.

Tá varð staðfest, at partarnir stóðu so mikið langt frá hvørjum øðrum, at tað fór at vera trupult at fáa eina semju í lag.

Partarnir samdust um at hittast aftur 7. desember kl. 10 til at velja semingsfólk. Tá varð semja um at velja Allan Skaalum og Niels W. Poulsen til semingsmenn.

Maskinmeistarafelagið kunnaði nú hini feløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum um støðuna.

Samráðingar við semingsmenninar byrjaðu 6. januar kl. 16. Og leygardagin 7. januar 2012 kl. 18 varð semingsuppskot lagt fyri partarnar.

Uppskotið gav eina lønarhækkan uppá 0,85 % til lønir frá 20.000,- kr. við minking upp til 50.000,- tá ongin lønarhækking skuldi vera.

Eftir innanhýsis fundir boðaðu báðir partar frá, at teir kundu taka undir við semingsuppskotinum, og 7. januar 2012 varð skrivað undir nýggjan 2 ára sáttmála. Sí talvu.




**Grafurin vísir lønarhækkingina í mánaðlønum frá 20.000 til 50.000,- kr.**

## MASKINMEISTARAFELAGIÐ: FØÐINGARDAGAR

| | | |
|---|---|---|
| Ólavur Jógvan Sørensen | 6. jan. 1942 | 70 ár |
| Jógvan Helgi Jacobsen | 2. jan. 1952 | 60 ár |
| Michael Strøm | 3. jan. 1952 | 60 ár |
| Kristian Andreasen | 9. mars 1952 | 60 ár |
| Eyðfinn Joensen | 23. jan. 1962 | 50 ár |
| Johannes Djurhuus Johannesen | 7. feb. 1962 | 50 ár |
| Borgar Biskopstø | 19. feb. 1962 | 50 ár |
| Magnus Winther | 21. mars 1972 | 40 ár |
| Eyðun Petersen | 26. mars 1972 | 40 ár |

## SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAGIÐ: FØÐINGARDAGAR

| | | |
|---|---|---|
| Petur Knudsen | 26. feb. 1932 | 80 ár |
| Daniel Veihe | 1. jan. 1942 | 70 ár |
| Vilhelm Poulsen | 14. jan. 1942 | 70 ár |
| Tórstein Petersen | 4. mars 1942 | 70 ár |
| Jens Sigvard Andreasen | 9. mars 1942 | 70 ár |
| Hans Poulsen | 12. mars 1942 | 70 ár |
| Jákup Danielsen | 15. jan. 1952 | 60 ár |
| Jón Hansen | 8. feb. 1952 | 60 ár |
| Jákup Martin Christiansen | 9. feb. 1952 | 60 ár |
| Dánjal Klakk | 11. feb. 1952 | 60 ár |
| Virgar Viberg | 15. feb. 1952 | 60 ár |
| Ásmund Olsen | 24. feb. 1952 | 60 ár |
| Julian M. Juul | 10. mars 1952 | 60 ár |
| Markus Suni í Norðnástovu | 18. jan. 1962 | 50 ár |
| Andras Ellingsgaard | 23. jan. 1962 | 50 ár |
| Marnar Højsted | 28. jan. 1962 | 50 ár |
| Karl Johan Tausen | 1. feb. 1962 | 50 ár |
| Kent Joensen | 16. feb. 1962 | 50 ár |
| Petur Hans Jacob Mikkelsen | 23. feb. 1962 | 50 ár |
| Hans Óli Viberg | 25. feb. 1962 | 50 ár |
| Thomas Augustinussen | 25. jan. 1972 | 40 ár |
| Janus Ellendersen | 28. feb. 1972 | 40 ár |
| Arnfinn Hansen | 1. mars 1972 | 40 ár |
| Janus Berthelsen | 10. mars 1972 | 40 ár |
| Edvin Rhoan Jacobsen | 21. mars 1972 | 40 ár |



### PETUR J. KNUDSEN 80 ÁR

26. februar 2012 rundar Petur J. Knudsen 80 ár. Petur var fyrsta túr sín til sjós í 1949. Tað var ein saltfiskatúrur við Suðuroynni undir Íslandi.

Í 1957 var Petur við søguliga túrin eftir Beini, sum var nýbygdur í Noregi. Eilar Jacobsen var skipari. Árini 1968 til 1978 sigldi Petur sum skipari við Lómi, Bliki og Heyki hjá Skipafelagnum.




# Betri at hava **gott í væntu**

**Sum limur í Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagnum hevur tú møguleika frítt at velja, hvar tú ynskir at hava tína pensjóns-samansparing og lívstrygging.**

Endamálið er at tryggja eina munagóða samansparing, sum er við til at leggja lunnar undir eina framhaldandi vælferð, tá ið tú fert frá fyri aldur.

Um tú hevur allar tínar privatu tryggingar hjá Tryggingarfelagnum Føroyum, kanst tú fáa heilt upp til 15% í avsláttri av tryggingar-gjaldinum. Um tú harumframt ert kundi hjá Betri pensjón, og rindar í minsta lagi kr. 18.000,- árliga til Betri pensjón, fært tú 20% í avsláttri av tínum tryggingum, óansæð um tú hevur eina, tvær, tríggjar, fýra ella fleiri tryggingarhjá Tryggingarfelagnum Føroyum. Samanlagt kann hetta geva heilt upp til 32% í avsláttri.
Vit geva tær bestu ráðgevingina, so tú kanst spara sum mest saman til eina betri pensjónstilveru.

**Meira fæst at vita á telefon 345 700**
**ella við at senda ein teldupost til betri@betri.fo**

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Betri pensjón




*Perkeningur á royndarferð*

## 50 ára minni:

# Tá Porkeningur varð bygdur

Seinast í fimmtiárunum og fyrst í sekstiárunum samtykti løgtingið fleiri lógir, sum høvdu til endamáls at endurnýggja føroyska fiskiskipaflotan. Hesar lógir gjørdu tað lagaligt at fíggja nýbygningar; talan var bæði um nýggjar lánimøguleikar og stuðul frá landinum.
Eitt úrslit av hesum nýggju møguleikum var, at føroysk reiðarí lótu byggja nýggj sløg av fiskiskipum; í fyrstu atløgu var serliga talan um stállínuskip. Tey fyrstu árini vóru stállínuskipini bygd á norskum skipasmiðjum; nøkur vóru bygd í Fraklandi og í Eysturtýsklandi.



*Frá vinstru: Olivur Holm, byggimeistari og Kjartan Mohr, stjóri*

## EITT SKIP UM MÁNAÐIN

Áhugin fyri hesum nýggja møguleika var so stórur, at fyrstu árini í trýssunum kom – í miðal – eitt nýtt stállínuskip í flotan um mánaðin.

Tá dugdu føroyskir politikarar at síggja, at vóru hesi skip bygd í Føroyum, so hevði tað skapt nógv nýggj arbeiðspláss í landinum.

Fyri at fáa hetta í lag samtykti løgtingi lóg, sum gjørdi tað møguligt hjá landskassanum at veita føroyskum skipasmiðjum serligan stuðul, um tær átóku sær at byggja slík skip.

## TÓRSHAVNAR SKIPASMIÐJA

Einasta skipasmiðjan í Føroyum, sum tá var før fyri at byggja havgangandi skip var P/F Tórshavnar Skipasmiðja. Leiðslan á Skipasmiðjuni dugdi at síggja, at tað hevði stóran týdning at fáa sær royndir á hesum øki.

Kjartan Mohr, sum var stjóri á Skipasmiðjuni, hevði hug at taka dystin upp, og fór tí saman við Olivur Holm, byggimeistara, eina kanningarferð til Noregs at vita, hvussu norskar skipasmiðjur løgdu slíkt arbeiði til rættis og hvørjar fortreytir annars skuldu vera í lagi.

## GÓÐAR VÓNIR

Teir komu aftur við góðum vónum, tí fleiri skipasmiðjur, sum teir høvdu vitjað, høvdu ikki frægari kor enn Tórshavnar Skipasmiðja. Summar vóru bara sprongdar inn í eina ur, og teir hildu seg ikki vera aftanfyri norðmennirnar, tá talan var um amboð av ymiskum slag. Tó so, neyðugt fór at vera at gera íløgur í byggihøll, teknistovu, amboð og útgerð av ymiskum.

## FARIÐ VAR TIL VERKA

Áðrenn farast kundi undir slíka bygging var neyðugt at hava eina byggihøll, sum burturav var ætlað til stálskipasmíð. Til fyrstu byggihøllina keypti Skipasmiðjan gomlu fimleikahøllina hjá realskúlanum. Hon varð tikin niður, tá nýggjur kommunuskúli varð bygdur ímillum Tróndargøtu og Tórsgøtu.

Í hesum bygningi, sum var settur upp á økinum hjá skipasmiðjuni í Lágabø, varð innrættað høll við sveisipláni í niðastu hædd og á aðru hædd avmerkingarloft, har skipið varð merkt upp í náttúruligari stødd við skabelónum av bondum og øðrum lutum.

## NÝGGJ AMBOÐ

Neyðugt var eisini at fáa til vega nýggj amboð, sum vóru neyðug til stálarbeiði, eitt nú eina pressu og ein krana, sum kundi lyfta eini fimm tons.

Gerast mátti eisini ein rullibeding, áðrenn kjølur kundi leggjast. Neyðugt varð eisini at byggja teknistovu til verkfrøðingin Nic. Jacobsen.

Á Skipasmiðjuni vóru bæði skipsbyggjarar, smiðir og maskinmenn, sum vóru eldhugaðir at taka hetta arbeiðið uppá seg.

## FYRSTI BYGGISÁTTMÁLIN

Men Tórshavnar Skipasmiðja valdi at fara hóvliga til verka, og beyð seg ikki beinleiðis fram alment í fyrstani.

Skipasmiðjan valdi í fyrstu atløgu at gera ein sáttmála við P/F Álaker, sum skipasmiðjan sjálv átti, um bygging av einum stállínuskipi.

Hetta skuldi vera eitt línuskip av somu stødd sum tey norsku, men nakað lagað eftir tí, sum føroyskir sjómenn hildu vera bestu loysnina.

## KAMBUR KEMUR INN Í MYNDINA

Um hetta mundi hevði partafelagið Kambur hjá porkeringum ætlanir um at fáa bygt eitt stállínuskip. Teir høvdu kortini ikki tikið støðu til, hvar teir skuldu lata skipið byggja.

Og tá Kjartan Mohr og Esmar Olsen úr Porkeri, um hetta mundi, hittast í J. C. Svabosgøtu fall prátið teirra millum inn á skipabygging, og Esmar spyr tá Kjartan um nakar møguleiki var fyri, at p/f Kambur kundi yvirtaka sáttmálan hjá P/F Álaker. Kjartan helt, at tað átti at vera ein møguleiki, og so var. Hetta hevði so við sær, at áðrenn kjølurin var strektur hevði Kambur yvirtikið byggisáttmálan hjá Álaker.



*Arbeiðsfólk, handverkarar og Porkeningur komin væl áleiðis*

## FARIÐ VAR UNDIR AT BYGGJA

Skipið, ið farið var undir at byggja var 111 føtur langt, 23 føtur breitt og 12 føtur djúpt.

Tað varð ætlað til at taka 150 tons í saltfiski. Framman fyri lastina var eitt frystirúm uppá 35 kubikkmetrar, sum kundi frysta niður í 25 stig.

Skipið skuldi kunna hava 35 tons av olju og 15 tons av feskum vatni, og motorurin var ein 330 hesta turbuløddur Vølund.

Tvey manningarrúm skuldu vera frammi undir bakkanum til fýra og tveir mans; í lugarinum tvey 4-manskømur. Í kahúttini skuldu vera fýra 2-manskømur og síðani skiparakamar á brúnni, har tann nautiska útgerðin, sum tá fanst, varð sett.

## LÓGGÁVA UM FÍGGING OG STUÐUL

Í fimmtiárunum var farið undir at fáa skapt eitt lóggávuverk, sum skuldi gera tað lættari hjá føroyingum at endurnýggja fiskiskipaflotanum. Hesar lógir bøttu munandi um møguleikarnar fyri fígging.

Samtykt varð lóg, sum heimilaði Realkredittstovninum at veita 50% av byggivirðinum í láni.

Grein nr. 1 í lóggávuni fyri Føroya Realkreditstovn er í dag soljóðandi: Føroya Realkreditstovnur, ið varð stovnaður við lóg nr. 60 frá 12. mars 1955, heldur fram sum sjálvsognarstovnur við navni Føroya Realkreditstovnur (Realurin). Endamál stovnsins er at veita lán við veð í fiskiførum, farmaskipum, flótandi eindum og førum í frálandavinnu og fiskaaling við heimstaði í Føroyum.

Annar veðrættur kundi fáast frá danska Fiskaríbankanum uppá 20%.

## BYGGISTUDNINGUR

Omaná hetta játtaði løgtingið at lata 20% í studningi av byggikostnaðinum. Tað einasta, sum varð kraft av teimum, sum lótu skipið byggja var, at teir høvdu 10% í reiðum eginpeningi.

Løgtingið samtykti eisini lóg, har landsstýrið fekk heimild at veðhalda mótvegis teimum, sum skuldu hava skipini, so skipasmiðjurnar vóru førar fyri at gera skipið liðugt.

Heimild varð eisini givin landskassanum at veita endurgjald fyri tað, sum tað kostaði at flyta byggitilfar til Føroya, t.v.s. farmagjald.

Somuleiðis varð samtykt løgtingslóg um seks prosent í studningi til fyrsta stálskipið, sum bygt varð á skipasmiðju í Føroyum. So her ráddi eisini um at vera fyrstur hjá grindini.

## PORKENINGUR

Kjølurin til fyrsta stálskipið bygt á føroyskari skipasmiðju varð lagdur á Tórshavnar Skipasmiðju í juni mánað 1960. Og tá skipið 3. juni 1961 fór úr bakkastokki fekk tað navnið Porkeningur.

Hetta var sannur hátíðardagur, ikki bara fyri havnarfólk og porkeningar; hendingin hevur verið samanborin við søguligu dagin, tá fyrsta sluppin varð keypt til Føroya í 1872.

Stór mannfjøld var komin saman í Lágabø, tá skipið var sjósett. Til hátíðarløtuna høvdu skúlabørnini í Havn fingið frí frá skúlanum. Og sum tað sømir seg vóru fleiri røður hildnar við nógvum og góðum lovorðum. Í røðu síni segði løgmaður m.a. at menn ikki høvdu sæð betri handverk og snotiligari linjur enn í hesum føri.

Skipið royndist eisini væl. Porkeningar høvdu skipið til árslok 1972, tá teir seldu til partsreiðaríið Morgunstjørnan í Runavík. Navnið, Morgunstjørnan, varð varðveitt, tá partafelagið Roðin á Eiði keypti skipið í 1982.

JFK | 710 Klaksvík | Faroe Islands | Tel. 409900 | jfk@jfk.fo




JFK

liv.fo

# Fá eitt ríkt lív

Lív hjálpir tær at fáa tað fíggjarliga í trygga legu



## Persónlig eftirløn

Lívið lagar seg ymiskt fyri okkum øll. Tí hava vit eisini tørv á ymiskum eftirlønum. Sum Føroya størsta og royndasta eftirlønarfelag, veitir Lív tær eina persónliga eftirløn. Vit hjálpa
tær at laga tína eftirløn til tað lív, tú vilt liva og til ta framtíð, tú hevur útlit til.
Kom inn á **liv.fo** og fá innlit í, hvør eftirløn hóskar best til tín.

Innlit í útlit

ekko 239 239